| | Blað nr.: 8 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. januar 2020 | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. januar 2020 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 3/20 – 21/20

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Jan Kartin Christiansen

**LUTTÓKU EISINI:**
Marius Múller
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Mangus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 10 |
| 4/20 | 17/01437-1 | Umsókn frá NAX um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til útgerð til ferðavinnu á sjónum. | 11 |
| 5/20 | 20/00001-1 | Bylgjubrótari til bátahylin við Sjógv í Kollafirði | 15 |
| 6/20 | 16/01062-14 | Sáttmáli koyring av døgverðaportiónum frá Lágargarði til heimabúgvandi pensionistar. | 17 |
| 7/20 | 15/01145-11 | Vegagerð til matr.nr. 1038 e-f-g-h-i og k, Tórshavn. Atkomuvegur verður gjørdur á litra em og part av matr.nr. 1010u, Tórshavn. Ognari Tórshavnar kommuna. | 21 |
| 8/20 | 19/01357-35 | Lendi. Breiðkan av Marknagils og Landavegnum. | 24 |
| 9/20 | 18/02146-3 | Eigarafeløgini Berjabrekka 1 og Berjabrekka 2, ynskja at yvirtaka matr.nr. 1464b, Tórshavn. | 26 |
| 10/20 | 19/04413-1 | Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur | 30 |
| 11/20 | 20/00339-1 | Víðka skipanina við ókeypis hallarleigu | 37 |
| 12/20 | 19/04348-1 | Grunnurin Williamshús | 39 |
| 13/20 | 19/01973-3 | Gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin, matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn | 41 |
| 14/20 | 19/01370-1 | Havnin sum súkklubýur | 43 |
| 15/20 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 48 |
| 16/20 | 19/04022-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn | 58 |
| 17/20 | 19/04118-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga | 61 |
| 18/20 | 18/01200-1 | Kanning um økt samstarv millum Kommunalu Brennistøðina og IRF | 63 |
| 19/20 | 20/00345-1 | Uttanhýsis kanning av samanlegging av KB og IRF | 69 |
| 20/20 | 19/04775-1 | Dagføring av burturkastgjøldum 2020 | 71 |
| 21/20 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 73 |

## ***3/20 Mál beind í nevndir 2020***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

## 4/20 Umsókn frá NAX um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til útgerð til ferðavinnu á sjónum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 05.05.2017 | 28/17 | 17/01437-1 |
| 2 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 60/17 | 17/01437-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 258/17 | 17/01437-1 |
| 4 Kaldbaksnevndin | 04.12.2017 | 11/17 | 17/01437-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 261/17 | 17/01437-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 112/18 | 17/01437-1 |
| 7 Vinnunevndin | 12.09.2018 | 32/18 | 17/01437-1 |
| 8 Vinnunevndin | 05.11.2018 | 44/18 | 17/01437-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2018 | 279/18 | 17/01437-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 11/20 | 17/01437-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 2/20 | 17/01437-1 |
| 12 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 4/20 | 17/01437-1 |

**Málslýsing:**
Í umsókn frá NAX, frá 24. apríl 2017, verður sókt um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til goymslu av útgerð til tiltøk, sum felagið serliga hevur á sjónum.

Sókt verður um øki til ein 16 – ferðir 30 metur stóran bygning, sum skal standa í vestara enda á økinum framman fyri bóndahúsini á Sundi.

Økið talan er um, verður oftani brúkt til upp- og avskiping av bulkvørum, sum liggja á økinum í eitt styttri tíðarskeið, tí eigur tað ikki at verða bygt meira á hesum økinum enn hægst neyðugt.

Umsóknin vísir eitt hús við einum tilbygningi eystur- og norðeftir, og fleiri portur eystursíðuni. Hetta ger, at óneyðuga nógv av økinum, sum annars verður brúkt til bulkvørur, ikki kann brúkast.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at loyva bygging til nevnda virksemi, men at samráðast við umsøkjaran um endaliga støðd, skap og staðseting.

**Vinnunevndin 05. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Støddin av bygninginum verður 16 ferðir 30 metur.
Fyri at økið eystan fyri bygningin kann verða brúkt til bulkvørur, er onki portur ella hurð á eystur síðuni.
Staðsetingin er sambært tekning j.nr. 17/01437-5 soleiðis at bygingurin er so vestaliga sum til ber.

Uppskot er gjørt til ein 25 ára leigusáttmála, har sagt verður at grundøkið skal brúkast til bygging av høll til goymslu av útgerð til tiltøk, sum leigarin hevur á sjónum.
Áðrenn umsøkjarin kann byggja, skal hann fáa byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við leigusáttmálanum, at staðsetingin verður sambært tekning j.nr 17/01437-5, og at onki portur ella hurð er á eystur síðuni.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Anniku Olsen, um at beina málið í Byggi- og býarskipanarnevndina og Kaldbaksnevndina.

**Kaldbaksnevndin 04. desember 2017:** Nevndin heldur at verkætlanin er áhugaverd. Nevndin skjýtur upp at bóndin verður hoyrdur og tað sum hevur týdning fyri málið er hæddin á bygningum.

**Ískoyti:**
Økið liggur í umráðispartinum B1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.

Virkini í umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4-6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Mest loyvda byggistig er 0,5

Mest loyvda hædd er 12 m (undantøk til kranar og einstakar bygningslutir t.d. trapputorn o.s.v.) og hæddin skal verða sett í hvørjum einstøkum føri út frá eini heildarmeting av nýtslu og skapi.

Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 12 m.

Í økinum er í dag ein elorkustøð hjá SEV, asfaltvirki og ymiskt av- og áskipanarvirksemi. Nevnast skal tó, at elorkustøðin tó liggur uttan fyri umráðispartin B1.

Umráðisparturin er ikki lagdur til ferðavinnudeplar og tað, sum har til hoyrir.

Vandin við at geva langtíðarloyvi til virksemi, sum ikki hoyrir til umráðispartin er, at tað í framtíðini kann steðga menningini av tí virksemi, som umráðsparturin upprunaliga er ætlaður til.

Niðurstøðan er tískil, at umsitingin metir ikki, at ætlaða virksemið hoyrir heima í umráðispartinum B1. Harafturat verður mælt til at finna aðra staðseting til virksemið í samráð

við Tórshavnar Havn. Eyðsætt kundi verið at savnað maritimt frítíðarvirksemi á einum stað, sum t.d. úti í Álakeri ella á Argjum.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at finna aðra staðseting til virksemið, grundað á, at umráðisparturin B1 ikki er ætlaður til frítíðarvirksemi, og at beina málið aftur í vinnunevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 12. september 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar hjá bóndanum.
Helena Dam á Neystabø var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti:**
Ongin viðmerking komin frá bóndanum.

**Vinnunevndin 05. november 2018:** Mælt verður til at geva loyvi at byggja og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga hóskar virksemið hjá NAX, sum tað verður lýst í umsóknini, ikki til økisásetingarnar í byggisamtyktini. Sum eisini lýst í omanfyri standandi ískoyti, sum varð samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini 09.05.2018, so er umráðisparturin sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t. Virkini í umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4-6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Umsitingin er vitandi um, at NAX í longri tíð hevur leitað sær eftir einum øki til sítt virksemið, og ynskiligt hevði verið, um ein meiri høglig staðseting varð funnin, so sum í Álakeri ella á Argjum.

Við at kommunan í dag ikki hevur aðra staðseting at vísa á, so metir umsitingin, at um byggingin og ætlaða ferðavinnu-virksemið verður skipað soleiðis, at ætlaða virksemið fyri umráðið ikki verður tarnað, og soleiðis at ferðafólk, sum eru partur av virkseminum hjá NAX ikki verða í vanda, við at virksemið verður staðsett á umrødda øki, so kann staðsetingin loyvast, sum ein fyribils loysn inntil nøktandi økið verður lagt av til ferðavinnu og líknandi virksemið í kommununi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini tann 9. mai 2018.

Um nevndin er sinnað at geva loyvi, verður mælt til:
- at hetta verður ein fyribils loysn í eitt áramál, inntil nøktandi øki verður lagt av til tílíkt virksemi.
- at virksemið verður skipað soleiðis, at ferðafólk ikki verða í vanda og soleiðis at verandi virksemið í økinum ikki verður tarnað
  at ein heildarætlan fyri verkætlanin, sum lýsir omanfyri nevndu fyrivarnir, verður løgd aftur fyri nevndina til góðkenningar, áðrenn endaligt loyvi verður givið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2018**: Samtykt at geva loyvi, treytað av:

- at hetta verður ein fyribils loysn í eitt áramál, inntil nøktandi øki verður lagt av til tílíkt virksemi.
- at virksemið verður skipað soleiðis, at ferðafólk ikki verða í vanda og soleiðis at verandi virksemið í økinum ikki verður tarnað.
- at umsøkjarin sendir inn eina ætlan, sum lýsir omanfyri nevndu fyrivarnir, áðrenn loyvi verður givið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við Nax. Ætlanin hjá Nax er at byggja ein bygning uppá uml. 500 $m^2$, sum kann rúma útgerð og virkseminum hjá teimum annars. Fyri at fáa fígging og raksturin at hanga saman, er neyðugt við eini loysn, sum í minsta lagi er 20-25 ár fram í tíðina og tí ynskja teir at loyvi ikki verður tíðaravmarkað.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 12. desember 2018.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at gera eina leiguavtalu uppá 15 ár við møguleika at leingja, treytað av at kommunan í 15 ára leigutíðini kann uppsiga sáttmálan við 2 ára freist við at keypa bygningin fyri avtalaða upphædd og at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við avgerðini hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini 15. januar 2020, og vísa á tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 12. des. 2019.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jan Christiansen, Jákup Dam, Turid Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

# 5/20 Bylgjubrótari til bátahylin við Sjógv í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 13.01.2020 | 4/20 | 20/00001-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 1/20 | 20/00001-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 5/20 | 20/00001-1 |

**Upprunin til málið:**
Tað hevur verið eitt ynski frá bátaeigarum, at fáa vart innsiglingina móti vindi av útsyðningi og vestri.

**Lýsing av málinum – samandráttur:** Tað eru 64 bátapláss í bátahylinum. Í 2016 blivu nýggjar bátabrúgvar við tilhoyrandi bátabummum lagdar út í bátahylinum. Útsyðningur og vestan liggur rættuliga tráður inn í innsiglingina, og ger at tað blívur óslætt í pørtum av bátahylinum.

**Lógir, ásetingar o.a.:** Byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:** Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Í fíggjarætlanini fyri 2020 er avsett 1,6 mió til bylgjubrótara í Kollafirði.

Tað eru tveir møguleikar at verja innsiglingina móti vindvánni, sum kemur út eftir fjørinum, annar er grótkast og hin er ein flótandi bylgjubrótari.
Metingar av kostnaðinum vísa, at eitt 60 m langt grótkast kostar 3.1 mió., meðan ein tilsvarandi langur flótandi bylgjubrótari kostar 1,6 mió.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Við teirri grundgeving, at býráðið hevur avgjørt at seta 1,6 mió av til verkætlanina, verður mælt til at seta ætlanina í verk, at útleggja 60 m av flótandi bylgjubrótara, fyri í mesta lagi 1,6 mió.

**Vinnunevndin 13. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 6/20 Sáttmáli koyring av døgverðaportiónum frá Lágargarði til heimabúgvandi pensionistar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 02.05.2016 | 31/16 | 16/01062-14 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 160/16 | 16/01062-14 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 133/16 | 16/01062-14 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 6/18 | 16/01062-14 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 225/18 | 16/01062-14 |
| 6 Eldranevndin | 28.11.2019 | 25/19 | 16/01062-14 |
| 7 Fíggjarnevndin | 04.12.2019 | 340/19 | 16/01062-14 |
| 8 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 298/19 | 16/01062-14 |
| 9 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 6/20 | 16/01062-14 |

**Málslýsing:**

Sáttmálið verður gjørdur millum fyritøkuna PETRA og Heilsu- og Umsorganartænastuna í Tórshavnar kommunu, sum umfatar útkoyring av døgverðaportiónum frá køkinum á Lagargarði til umleið 100 heimabúgvandi pensionistar í Tórshavnar kommunu. Sáttmálin umfatar upp til 120 brúkarar. Um talið kemur uppum, kann nýggj samráðing verða um prísin.

Talan er í stóru um framhald av sáttmála, sum táverandi sjálvsognarstovnurin Lágargarður gjørdi við nevndu fyritøku til hesa somu tænastu.

Nýggi sáttmálin er tó nakað víðkar. Økið fevnir nú um Tórshavn, Velbastað, Kirkjubø, Kaldbak og Kollafjørð. Harumframt umfatar sáttmálin dagliga koyring av heitum døgverða til Tjarnargarð.

Sáttmálin er galdandi í 2 ár frá 1. Januar 2016, og verður tá eftir ætlan boðin út sambært innkeyps- og útboðspolitikkin fyri keyp av vørum og tænastum hjá Tórshavnar kommunu.

Sáttmálaupphæddin er kr. 360.120 u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, sosialdeildarleiðarin og leiðarin á løgdeildini mæla til at samtykkja sáttmálan.

**Trivnaðarnevndin 2. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Talan er um hækkan av gjaldinum og leingjan av verandi sáttmála millum fyritøkuna fa. Petra og Tórshavnar kommunu um útkoyring av døgurðaportiónum til fólkapensjónistar og koyring av døgurðum til Tjarnargarð og Vallalíð.

Verandi sáttmáli var galdandi til 1. januar 2018.

Sambært sáttmálanum § 6 í sáttmálanum hevur Tórshavnar kommuna rætt til at leingja sáttmálan tvær ferðir eitt ár, tað vil siga til 31. desember 2019.

Sambært § 9 í sáttmálanum verður samráðing um prísin á tænastuni, um talið av brúkarum fer upp um 120 ella tann ásetta koyritíðin ikki heldur.

Fa. PETRA tekur sær framvegis av matartænastuni hjá Tórshavnar kommunu, ið er eitt tilboð sambært § 10 í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (Eldralógin).

Í 2019 skal útkoyringin bjóðast út galdandi frá 1. januar 2020 sambært innkeyps- og útboðspolitikkinum fyri keyp av vørum og tænastum hjá Tórshavnar kommunu.

Talið av brúkarum var í 2016 uml. 100.

Í tíðarskeiðinum 13.05.18 til 12.06.18 vóru 128 brúkarar íalt, býttir upp á 119 bústaðir. Koyring av døgurða til Tjarnargarð og Vallalíð er ikki íroknað.

Sambært fa. PETRA heldur koyritíðin ikki longur. Tey koyra uml. 1 tíma longri hvønn dag, longda koyritíðin skyldast fyri ein part økta talið av brúkarum, og fyri ein part at tað tekur longri tíð at koyra vegna tær mongu (119) vegbungurnar, tey koyra um hvønn dag. Vegbungurnar økja um koyritíðina og fara illa við bilinum.

Vísandi til økta virksemið, tá tað kemur til tal av brúkarum og til at ásetta koyritíðin ikki heldur, ynskir Fa. PETRA, at prísurin á tænastuni verður reguleraður í 2019.

Sáttmálaupphæddin er í løtuni kr. 33.238,55 pr. mð. íroknað mvg.
Mett verður at ein regulering á 6 % av prísinum galdandi frá 1. januar 2019 er hóskandi. Hetta merkir ein meirkostnað á 1994,31 pr. mð., íalt 24.000 , íroknað mvg. fyri árið 2019.

Hækkanin ávirkar deild 2720 og skal hædd takast fyri hækkanini í fíggjarætlanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla til at hækka fasta gjaldið, sum fyritøkan fa. PETRA fær fyri at koyra døgurðar út til fólkapensjónistar v.m. verður hækkað við kr. 1.994 pr. mð. Hækkingin er grundað á økta talið av brúkarum og longda koyritíð.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**

Nýggjan sáttmála. Útkoyring av mati frá Lágargarðið til heimabúgvandi pensjónistar og til Tjarnargarð

**Málslýsing**

Núverandi sáttmálin við Fa. PETRA um útkoyring av døgurða frá køkinum á Lágargarði til heimabúgvandi pensjónistar og til Tjarnargarð gongur út tann 31. desember 2019. Í sáttmálanum er ásett, at tá sáttmálin gongur út skal hesin bjóðast út sambært innkeyps- og útboðspolitikkinum fyri keyp av vørum og tænastum hjá Tórshavnar kommunu.

Tænastan fevnir um útkoyring av køldum døgurða til umleið 100 borgarar allar gerandisdagar, umframt koyring av heitum døgurða til Tjarnargarð allar dagar í árinum. Koyringin fevnir um øll landføst øki í kommununi, og tal av brúkarum broytist alt eftir hvør tørvurin er á tænastu.

Heilsu- og umsorganarfyrisitingin hevur spurt Vinnuhúsið um yvirlit yvir veitarar, ið eru skikkaðir at átaka sær hesa veiting, og við støði í hesum er tilboð umbiðið frá 7 veitarum - har av 3 veitarar lótu inn tilboð.

Innkomnu tilboðini eru gjøgnumgingin og mett verður, at allir veitarar høvdu klárað at lyfta uppgávuna til fulnar. Tí verður mælt til at tikið verður av bíligasta tilboðnum.

Um tikið verður av bíligasta tilboðnum, merkir hetta samstundis ein øktur kostnaður. Tí hevur Heilsu- og umsorganarfyrisitingin samstundis endurskoðað núverandi brúkaragjøld fyri matartænastuna, sum ikki eru broytt síðan kommunan yvirtók eldraøki 1. januar 2015.

Heilsu- og umsorganarfyrisitingin metir, at brúkaragjøldini fyri matartænastu eiga at hækka 10%, og at tey framyvir verða prístalsregulera á hvørjum árið, eins og t.d. verður gjørt við øll brúkaragjøld hjá Almannaverkinum.

**Tilmæli**

Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í Heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla eldranevndini til at taka undir við:

- at Heilsu- og umsorganartænastan ger ein 3 ára sáttmála við veitaran við lægsta tilboðinum
- at brúkaragjøldini hækka 10%, og at brúkaragjøldini framyvir verða prístalsregulera árliga.

og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 28. november 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina og býráðið.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen, tekur undir við at Heilsu- og umsorganartænastan ger ein 3 ára sáttmála við veitaran við lægsta tilboðnum, men tekur ikki undir við at hækka brúkagjøldini.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í eldranevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og vísir til støðuna hjá minnilutanum í eldranevndini.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Annika Olsen setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Skotið verður upp at taka undir við 1. pkt. og gera 3 ára sáttmála við lægsta tilboðnum og játta eykakostnaðin á 130.000 kr. sum eykajáttan av konto 20910 á konto 2722-2716, matartænastan.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 7/20 Vegagerð til matr.nr. 1038 e-f-g-h-i og k, Tórshavn. Atkomuvegur verður gjørdur á litra em og part av matr.nr. 1010u, Tórshavn. Ognari Tórshavnar kommuna.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 04.12.2019 | 338/19 | 15/01145-11 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 17/20 | 15/01145-11 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 8/20 | 15/01145-11 |
| 4 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 7/20 | 15/01145-11 |

**Upprunin til málið:** Advokatur hevur vegna eigaran av matr. nr. 1038e, f, g, h, i og k, Tórshavn, 29. august 2019, sent kommununi umsókn viðv. atkomuvegi til nevndu ognir.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Advokaturin vísir á, at verandi eigari av grundstykkjunum, hevur ætlanir um at lýsa grundstykkini til sølu og at selja hesi undir einum.

Biðið verður um, at komandi keypari til grundstykkini kann gera veg til stykkini á litra em sambært teimum treytum, sum Tórshavnar kommuna setur.

Tá ið trøðin í síni tíð varð útstykkjað, lat útstykkjarin økið litra em til Tórshavnar kommunu sum part av tí vegi, sum tá var ætlanin skuldi ganga frá Heygsvegi og oman á Frælsi og sum eisini skuldi verða atkoma til omanfyrinevndu seks grundøki.

Ætlanin um gjøgnumgangandi vegin frá Heygsvegi oman á Frælsi varð seinni slept.

Byggi- og umhvørvisdeildin hevur umrøtt málið í 2015, og var niðurstøðan, at eigarin av teimum 6 grundstykkjunum, sum onga vegatkomu hevur, skal gera ein veg frá Frælsinum og inn til tey 6 grundstykkini. Krøv verða sett til breidd av vegi og gongubreyt. Málið skal leggjast fyri teknisku nevnd til góðkenningar, og skal umsøkjarin lata inn tekniskt projekt til góðkenningar. Sí bræv dagfest 09.04.2015. (Skjal 15/01145-8)

Sambært brævi frá kommununi til umboð eigarans dagfest 19. juni 1990 framgongur, at býráðið metir, at ognarspurningurin til vegin ongan týdning hevur. Avgerandi er hinvegin, at vegurin, sum er útlagdur í matriklinum og liggur sum atgongd til tey seks stykkini, verður gjørdur. Málið er viðgjørt í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndini 07.juni 1990. (Skjal 15/01145-12).

Vísandi til tilfarið í máilnum verður mælt til at geva umsøkjara váttan um, at tann til eina og hvørja tíð verandi eigari av matriklunum 1038e, f, g, h, i og k, kann gera veg til stykkini á økinum, sum er útlagt til veg, og at útstykkjarin ikki skal rinda kommununi fyri nýtslu av lendinum undir vegnum.

Hetta er treytað av, at kommunan, tá ið vegurin er liðugur og góðkendur av kommununi, kann yvirtaka vegin ókeypis.

Onki byggiloyvi verður givið á nevndu grundstykkjum, fyrr enn vegurin er liðugt gjørdur og góðkendur av Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at staðfesta, at eigarin av matr. nr. 1038e, f, g, h, i og k, Tórshavn, kann gera veg á litra em og part av matr.nr. 1010u, uttan viðurlag til Tórshavnar kommunu og sambært treytum, ið Tórshavnar kommuna setir.

**Fíggjarnevndin 04. desember 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tey 6 grundstykkini liggja øll í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini, sum er ætlað til sethúsabygging og atkomuvegurin kemur at liggja í A1, A2 og D3, sum øll eru ætlað til bygging.

Vegurin má gerast við gongubreyt, avvatning, gøtuljósum og annars við øllum installatiónum og leiðingum sum skulu til.

Grundstykkini eru ikki gjørd byggibúgvin og tí má kloakk, el og aðrar leiðingar leggjast inn til økið, umframt reinsiverk. Umsitingin hevur ikki kannað eftir hvar leiðingar kunnu bindast í.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at eigarin av matr. nr. 1038e, f, g, h, i og k, Tórshavn, fær loyvi til at gera atkomuveg inn frá vegnum «á Frælsinum», til teir 6 matriklarnar, treytað av at hetta verður uttan kostnað fyri kommununa

og annars sambært treytum sum umsitingin setir, m.a. at atlit verða tikin at gøtuskipanini í økinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 8/20 Lendi. Breiðkan av Marknagils og Landavegnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 3/20 | 19/01357-35 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 8/20 | 19/01357-35 |

**Upprunin til málið:** Verkætlan. Breiðkan av Marknagils og Landavegnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Kommunan hevur tørv á at ogna sær lendi framvið Marknagils og Landavegnum. Sí yvirlit. Skjal nr. 19/01357-78

Umsitingin hevur havt samráðingar við eigararnar, men er enn ikki komið á mál við øllum eigarunum. Ráð, ráðgevandi verkfrøðingar, virðismetir lendið til kr. 1.250 fermeturin. Onkrir av eigarunum meta at virðismetingin er ov lág, og vísa til at ógrivin grundstykkir á uml. 500m2, verða lýst til sølu fyri ein prís umleið milliónina svarandi til ein fermeturprís á kanska omanfyri 2.000 kr.m2.

Kommunan keypir lendið fyri 2.000 kr.m2.

Arbeiðið inni á økinum verður gjørt í samráð við eigararnar, og er útgangstøðið, at kommunan sum minimum endurskapar økini á sama støðið sum frammanundan, men við nýggjum tilfari. Í tveimum førum er harumframt talan um ampaendurgjald, tí neyðugt verður at rinda fyri endurskipan av grundøkjum.

Í tveimum førum verður talan um at geva eigaranum annað lendið ístaðin fyri tað lendi sum hann missir. Hetta verður gjørt við marknaðarumskipan.

| Matr.nr. | | Vídd m2. | Keyp/ampar. kr. | |
|---|---|---|---|---|
| 1173c | Marknagilsvegur. ( Føroya Landstýri ) | 86 | 172.000,- | |
| 919 b | Landavegur 98 | 160 | 0,- | m.u |
| 1097a | Hornið Landavegur Marknagilsv. | 61 | 122.000,- | |
| 1094d | Marknagilsvegur uml. | 154 | 308.000,- | |
| 918c | Landavegur 90. uml. | 22 | 74.000,- | |
| 918d | Landavegur 88. uml. | 25 | 102.500,- | |
| 918f | Landavegur 86. uml. | 24 | 0,- | m.u |
| Upphædd tls. | | 532 m2. | **778.500,-** | |

Kommunan hevur enn ikki fingið endaligt svar frá øllum eigarunum, og kunnu broytingar tí koma ímun til verandi. Tað hevur stóran skund at fáa játtan til avtalurnar viðvíkjandi matriklunum 918c, d og f.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Avtalur. 19/01357 – 66 – 67 – 68 – 69 – 70 - 71 – 77. Yvirlit 78 ) og kortyvirlit. 19/011357 – 1.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við fyriliggjandi avtalum um keyp av lendi v.m. fíggjað av L81036 Liðugtgerð av Hans Andriasargøtu.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við málinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 9/20 Eigarafeløgini Berjabrekka 1 og Berjabrekka 2, ynskja at yvirtaka matr.nr. 1464b, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 126/19 | 18/02146-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 18/20 | 18/02146-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 7/20 | 18/02146-3 |
| 4 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 9/20 | 18/02146-3 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Yvirlit yvir matriklini á Berjabrekku:
Matr. nr. 1464b. Hitamiðstøðin. Vídd uml. 590 $m^2$ við ástandandi hitamiðstøð uml. 70 $m^2$.
Matr. nr. 1464c. Berjabrekka 1. Vídd 13.085 $m^2$. 71 íbúðir eru frámatrikuleraðar.
Matr. nr. 1464d. Berjabrekka 2. Vídd 6.310 $m^2$. 32 íbúðir eru frámatrikuleraðar.

**Ymiskt:**
Sambært § 15 í viðtøkunum fyri Eigarafelagið á Berjabrekku framgongur, at hitamiðstøðin er felags ogn, og er raksturin av henni fyri felags rokning.
Hvør einstakur eigari rindar aconto eitt av nevndini ásett gjald, smb. § 13.
Eigarafelagið hevur øll árini, síðani íbúðirnar vóru bygdar í 80unum, arbeitt sum um hitamiðstøðin er eigarafelagsins ogn, og hevur eigarafelagið havt
viðlíkahaldið av hitamiðstøðini.
Talan er um gamalt mál frá 1980unum, men sambært samrøðu við Ronald Poulsen, sum hevði eftirlitið um hendi fyri kommununa, var hitamiðstøðin partur av verkætlanini, og tískil er hon eisini goldin av íbúgvunum.
Umsitingin hevur skjøl, sum undirbyggja, at Hitamiðstøðin var partur av byggirokniskapinum.

**Tilmæli:**
Vísandi til:
- at Hitamiðstøðin sambært viðtøkunum er felagsogn hjá íbúgvunum á Berjabrekku.
- at Eigarafelagið hevur havt rakstur og viðlíkahaldið av hitamiðstøðini um hendi, síðani hitamiðstøðin varð bygd í 1980unum
- at Eigarafelagið øll árini hevur arbeitt, sum um hitamiðstøðin var ognhjá íbúgvunum á Berjabrekku,

Mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til at skriva leigusáttmála við íbúgvarnar á Berjabrekku/Eigarafelagið á Berjabrekku um leigu av undirlendinum undir hitamiðstøðini.
Leigusáttmálin er treytaður av góðkenning frá Innlendismáláráðnum og av, at Eigarafelagið kann góðtaka treytirnar í sáttmálanum.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tinglýsingin hevur boðað frá, at tað er ikki møguligt at tinglýsa leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og eigaran av Hitamiðstøðini.

Orsøkin er at matrikul nr. 1464b, umfatar sjálvt lendið og alt sum hará stendur, herundir ástandandi hitamiðstøðina.
Trupult er at finna út av hví undirlendið undir hitamiðstøðini er ogn hjá kommununi, men vóru sera nógvir trupulleikar í samband við bygging av íbúðunum á Berjabrekku.
Mett verður at talan er um eitt forsømilsi, at matrikulin ikki er tinglýstur, til íbúgvarnar.
Grundøkið er uml. 590 m2, og er hitamiðstøðin uml. 70 m2.
Tilber at frámatrikulerað økið har hitamiðstøðin liggur, talan er um umleið 70 – 90 m2 og handa eigarafelagnum henda partin, meðan restin umleið. 500 m2, framhaldandi verður kommunal ogn.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at handa eigarafelagnum/íbúgvunum í Berjabrekku undirlendið undir hitamiðstøðini.
Eigarafelagið rindar allar útreiðslur viðvíkjandi matrikuleringini.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eigarafelagið var á fundi við kommununa í november 2018.

Eigarafelagið greiddi frá, at Eigarafeløgini Berjabrekka 1 og 2, hava ætlanir um at byggja felagshús á grundstykkið matr.nr. 1464b, Tórshavn.

Fleiri av íbúðunum eru sera smáar, og er stórur tørvur á felagshølum, bæði til limirnar at brúka, og eisini til nýtslu hjá Eigarafeløgunum.

Eigarafelagið greiddi frá, at Bústaðir byggir 36 íbúðir tætt við og hevur tørv á felagshølum til íbúðirnar. Verkhúsið Virkni sum liggur beint við, hevur eisini tørv á felagshølum.

Ætlanin umfatar bygging av einum bygningi í trimum hæddum.

Sambært eigarafeløgunum hava Bústaðir og Virkni sagt seg hava áhugað í at leiga høli frá eigarafeløgunum. Bygningurin verður lánifíggjaður, og verður lán/rakstur goldin við leiguinntøkum.

Upplýst verður at hetta enn er á ætlanarstigi.

Eigarafeløgini ynskja at fáa eina tilsøgn frá kommununi um at kommunan handar feløgunum grundstykkið, soleiðis at feløgini í samstarvi við Bústaðir og Virkni, kunnu arbeiða víðari við ætlanini.

Í 2013 samtykti býráðið at handa Eigarafeløgunum 1 og 2, undirlendið undir Hitamiðstøðini.

Økið við hitamiðstøðini varð frábýtt høvuðsmatriklinum, og varð síðani handað eigarafeløgunum við skeyti.

Henda "neyð"loysn varð vald, vísandi til at kommunan hevði ilt við at finna skjøl sum lýsa, júst hví hesin matrikulin ikki er umfataður av lendinum hjá eigarafeløgunum.

Eigarafelagið handaði á fundinum kommununi byggitekningar dagfestar 27.08.1986 av bygningi sum var innrættaður sum hitamiðstøð og felagshús, og sæst felagshúsið eisini í uppruna faldaranum sum sýndi ætlanina í síni heild.

Sambært skjali dagfest 22.apríl 1991 ( J. Nr. 32/2.1989 ) framgongur at mettur kostnaður av einum felagshúsi v.m. er kr. 400.000,00, og verður eisini viðmerkt viðvíkjandi felagshúsinum, at býráðið ikki hevur tikið endaliga støðu til hesa bygging og sostatt heldur ikki “tykkara viðmerking” at KLE kann átaka sær at gera arbeiðið fyri hesa upphædd, ið sett er í sáttmálarnar við eigarar á 1. og 2. Byggistigi á Berjabrekku.

Tískil er ongin ivi um at felagshús hevur verið partur av upprunaligu ætlanini, og at ætlanin hevur verið at bygt felagshús saman við hitamiðstøðini.

Út frá hesum verður mett sannlíkt at matrikulin átti at veri ogn hjá eigarafeløgunum, og at kommunan treytað av loyvi frá Heilsu og Innlendismálaráðnum, eigur at handa eigarafeløgunum grundstykkið.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Avhending av kommunalari fastogn.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Ymisk skjøl viðheft málslýsing.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Økið, ið biðið verður um, er upprunaliga partur av byggingini í Berjabrekku, og er tað tí í tráð við uppruna ætlanina, at økið hoyrir til eigarafeløgini á Berjabrekku, so felags hentleikar eru í nærumhvørvinum til frama fyri trivnað økinum.

Um økið kann bera ein bygning í trimum hæddum og hvussu hann skal skipast, má viðgerast nærri av kommununi, tá málið verður meira ítøkiligt. Berjabrekka er tætt bygt øki, og er alneyðugt at møgulig bygging tekur atlit at og hóskar til verandi bygging og skipan í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at ognin verður latin eigarafelagnum Berjabrekka I og II eftir galdandi treytum og við treytin sum umsitingin setir, soleiðis at ognin verður brúkt til tað sum hon frá byrjan varð ætlað til og at ein ítøkilig byggiætlan verður send kommununi til góðkenningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 10/20 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 324/19 | 19/04413-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 9/20 | 19/04413-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 33/20 | 19/04413-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 12/20 | 19/04413-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 10/20 | 19/04413-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin.

**Samandráttur**
TK hevur 5 fótbóltsvallir í fullari støðd, umframt Eysturvøll og tilhoyrandi stadion kring leikvallirnar. Talan er um stór og týðandi anlegg, ið hýsa umfatandi virksemi gjøgnum stóran part av árinum, men eisini anlegg, ið tørva regluligar dagføringar v.m. Í málinum verður gjørd eina støðulýsing, umframt givið eitt boð uppá framtíðar løgutørv.

**Lýsing av málinum**

Alment
Metingarnar í hesum yvirlitinum eru í høvuðsheitum grundaðar á metingar hjá umsitingini og Ítróttaanleggum. Talan er um yvirskipaðar metingar, sum skulu takast við ávísum fyrivarni, men sum geva eina rímiliga greiða ábending. Í hvørjum einstaka føri vil ítøkilga tilgongdin geva eitt endaligt svar uppá kostnaðir v.m.

**Viðv. tørvi á at skifta graslíki:**

- Ovari vøllur í Gundadali
Seinasta vallarkanningin í sambandi við UEFA-dystir var gjørd á várið 2019 og fekk vøllurin aftur góðkenning. Sí hjálagt skjal. Vøllurin er enn í rímiligum standi, men verður neyðugt at fyrireika eina møguliga útskifting innan stutta tíð. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst í summar lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til á sumri 2021 og skiftast á sumri 2021. Feløgini í Gundadali mæla hinvegin til at skifta vøllin í 2020, og at sprinkling eigur at verða løgd undir vøllin. Vøllurin er næsttýdningarmikli fótbóltvøllurin hjá TK. og verður mett at útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.300 tkr., við sprinkling nærri 5.000. tkr

- Niðari vøllur
Vøllurin er nógv skalaður í sambandi við Vesturskýlisverkætlanina á Tórsvølli. Verkætlanin er væntandi farin av vøllinum á heystið 2020 og verður mælt til at gera økið í stand aftur og skifta vøllin á várið 2021, enn er tó óvist viðv. skaðum og lendisarbeiði. Saman við neyðugum lendisarbeiði verður samlaði kostnaðurin mettur til uml. 5.000-5.500 tkr.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Vøllurin er tann elsti – umleið 10 ár og stendur fyri útskifting. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat, men er tað uppá lánta tíð.

Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2021 og skal í seinasta lagi skiftast á várið/sumri 2022. Útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.000 tkr.

- Tórsvøllur
Seinasta vallarkanningin var gjørd á várið 2019. Sí hjálagt skjal. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2020, og sostatt ikki skiftast fyrrenn á vári/sumri 2021. Hinvegin ætlar FSF at skifta vøllin í 2020 í sambandi við, at FSF er vertur fyri EM-endaspæli fyri U17 í apríl/mai 2020. Vøllurin er týdningarmiklasti fótbóltvøllurin í TK og verður mett, at útskifting av vøllinum, flyting og umskipan av sprinklaraskipan (7 pkt. til 12. pkt.) o.a. verður mett til umleið 5.000 tkr. FSF hevur sagt seg vera sinnað at rinda 50% av kostnaðinum.

- Eysturvøllur
Vøllurin er sum heild í góðum standi og er ætlanin at hann skal halda nøkur ár afturat.

- Hoyvíksvøllur
Vøllurin er í góðum standi. Tað ganga fleiri ár áðrenn tørvur aftur er á útskifting.

**Viðv. krøvum frá FSF til ljósskipanir við vallirnar**:

Alment
Vallarreglugerðin hjá FSF setur krav um 250 lux til dystir í fremstu og næstfremstu deild, tó um gjørd verður skipan við 350 lux fæst 400 tkr. (við fyrivarni!) í stuðli frá FSF/Hattrick-grunninum. Í tann mun feløgini ikki uppfylla treytirnar skulu tey vísa á ein tiltaksvøll tá tørvur er á tí. Her vísir kommunan á Tórsvøll.

- Ovari vøllur
Ljósstyrkin pt. er umleið 80 lux. Skal vøllurin uppfylla vallarreglugerðina er ábending um, at bæði fundament og mastrar skulu skiftast umframt lutvíst nýggjar el-talvur, kábling og + nýggir projektørar. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Argir
Styrkin pt. er nøkur tíggju lux og uppfyllir ikki vallarreglugerðina. Helst mugu fundament, mastrar, elskipan og projektørar gerast av nýggjum. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Niðari vøllur
Er framyvir mest ein venjingarvøllur og ikki til dystir í fremstu og næstfremstu deild. Í sambandi við Tórsvallaverkætlanina verða mastrar og ljós skift á eystaru síðu og kostar tað nakrar fáar hundrað túsund. Vestara síða er eisini um at verða útlivað og kostar helst minst eini 1.500 tkr. at dagføra.

- Hoyvíksvøllur
Ljósskipanin er nýggj og ca. 250 lux og tekur seg væl út og tykist hava lítlan ampa fyri grannalag. Uppfyllir vallarreglugerðina hjá FSF. Ongin orsøk sum er til broyting ella stórvegis íløgur.

- Eysturvøllur
Tað verður ikki mett neyðugt við nøkrum serstøkum átaki.

**Umstøður kring station**

- Ovari vøllur í Gundadali
Í sambandi við skifting av graslíkinum er tørvur á at gera nýggja girðing, umframt aðrar ábøtur á vestaraskýli o.a.

- Niðari vøllur
Í sambandi við upprætting av undirlagnum og nýggjum graslíki skal eisini nýggj girðing gerast, umframt finna eina góða loysn fyri økið móti ovara vølli.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Tørvur á at gera ymiskar ábøtur, herundir betri p-viðurskifti, snøgga kring stadion v.m.

- Tórsvøllur
Er partur av øðrum máli. Stig 8 í avtaluni við FSF um økið har bygningarnir við niðara vøll standa – er næst á skrá.

- Eysturvøllur
Ynskiligt at fingið gjørt fleiri p-pláss norðanfyri stadion.

- Hoyvíksvøllur
Tørvur er á eini røð av hentleikum. Station hevur undantak frá reglunum í Vallarreglugerðini. Talan er um mio.kr. tørv. Av kringumstøðunum kunnu nevnast tørv á at tryggja skráningin norðanfyri móti Skúlanum við Løgmannabreyt, at gera áskoðarapláss, felagshús til skifting v.m. Umframt átroðkandi tørv á at gera hægri girðing sunnanfyri vøllin móti Jørundargøtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Graslíkisvallir hava við sær umhvørvisárin herundir serliga dálking frá gummigranulati o.a. Umsitingin og Ítróttaanlegg leggur seg eftir at loysnir og røkt eru so frægar sum gjørligt.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við einari endaligari tilráðing um raðfestingar og tíðarætlan til ein komandi fundi

**Mentamálanevndin 27. November 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðar-íløguætlanini er lagt upp til fígging til áhaldandi dagføringar 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 5.000 tkr. til Gundadal/Argir (vallarøkið) og ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 3.000 tkr. 2022, umframt ætlaðar 7.000 tkr. í 2021 til ljós til vøllir í Gundadali og á Argjum.

**Sjónarmið hjá HB og B36**
Umsitingin hevur havt fund við HB og B36 um raðfestingar av tøka løgukarminum fyri 2020 og hugsanir um ár 2021 og framyvir og umrøddu, um feløgini mettu, at ljósskipan ella graslíki skuldi koma fyrst í raðfestingunum fyri 2020. Hetta tí tað ikki er fíggjarliga møguligt at fremja báðar verkætlanirnar í 2020 fult út innan fyri givna fíggjarkarmin. Teirra einmælta tilmæli er, at TK skiftir graslíki á ovara vølli á sumri 2020 og um møguligt eisini at fáa sprinklaraskipan til vøllin ella at gera fyrireikingar til tað.

Við støði í galdandi samtyktu fíggjarætlan fyri 2020 og teimum teimum fíggjarligu útlitunum, umframt tilmælinum frá HB og B36, umframt dialogi við FSF, verður mett, at fylgjandi raðfesting er eitt boð upp á raðfestingar í 2020, 21 og 22. Henda raðfesting er tó ikki meiri føst enn at hon kann endurskoðast, so hvørt orsøkir eru til tess.

**Ráðgeving í sambandi við verkætlanirnar**
Gerast skulu avtalur um ráðgeving um graslíkisvøllin. Hartil kemur spurningurin um sprinkling. Verður avgjørt at fara undir fyrireikingar til at gera spinklaraskipan til ovara vøll, er eisini upplagt hava í huga framtíðar tørvin at leggja rør til útskifting av el-kaðalum til komandi nýggju ljósskipanina.

Arbeiðið uppá nýggja Vesturskýlið á Tórsvølli gongur sína gongd og herundir liðugtgerð av horninum móti B36 húsinum. Ein komandi nýggj ljósmastur til ovara vøll skal sannlíkt setast

har á leið, og er tí upplagt at fáa gjørt eitt mastrafundament til hana longu nú í 2020, so tað ikki verður neyðugt at fara afturumaftur í 2021, tá ljósskipan annars ætlandi skal gerast við Ovara vøll.

Sostatt er greitt, at talan er um eina samanseting av fleiri ráðgevaraøkjum t.v.s. innan lendis- og graslíkisviðurskifti, innan sprinklaraskipan (HVS) og innan konstruktión og el hvat viðvíkur mastrafundamenti til nýggja ljósmastur við B36 húsið/Tórsvøll.

Um tað skal bera á mál, serliga við at skifta graslíki á sumri 2020, er neyðugt at fáa gjørt avtalur við ráðgevast sum skjótast og fáa boðið arbeiðini út.

Hvat viðv. gerð av mastrafundamenti við B36-húsið verður mett mest hóskandi at geva ráðgevunum, ið eru á teirri verkætlanini, møguleika fyri at gera ískoytisavtalu um tað, umframt at geva høvuðsarbeiðstakaranum har høvi at gera avtalu um gerð av arbeiðinum. Hetta tí at tað vanliga vil vera óneyðuga tvørligt at fáa aðrar ráðgevar og arbeiðstakarar inn um entreprisumark, har aðrir longu virka.

**Máltalva/stórskermur**
Verandi stórskermur er ikki í nøktandi standi til at tað er ráðiligt at brúka hann til komandi kappingarár, ið byrjar í mars 2020. Tí er átroðkandi sum skjótast at fara undir at útvega ein nýggjan. Umsitingin hevur kannað, um tað hevði borið til at leigað ella langtíðarleigað ein slíkar stórskerm í staðin fyri at keypa hann. Fyrimunurin við at leiga er minni tekniskur váði og skjótari útskifting, ið vanliga vildi verið 5. hvørt ár. Mettur kostnaður fyri ein slíkan skerm er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

**Meting um hvat letur seg fremja innan fyri setta fíggjarkarmin**
Vegna atlit til marknaðar- og kappingarviðurskifti eru mettar upphæddir o.a. lagdar í hjálagda fylgiskjali.

**Tórsvøllur stadion**
Tórsvøllur, sum tjóðarleikvøllur Føroya, er mentur og bygdur stigvíst í tøttum samstarvi millum FSF og TK. Sí hjálagt avrit av galdandi sáttmálum millum FSF og TK og sí eisini mál 16/00962 Tórsvøllur - vestursíðan. Arbeitt verður við at gera endaligu rakstraravtaluna fyri Tórsvøll lidna til nevndarviðgerð í vár.

Vísandi til seinastu vallarkanningina av Tórsvølli, og av tí at FSF er vertur fyri HM endaspæli fyri U17 kvinnur í mai-juni 2021, ynskir FSF at skifta graslíki á Tórsvølli í 2020. Eisini ynskir FSF at fáa gjørt fleiri sprinklaradysur og fáa flutt verandi sprinklaradysur á vøllinum soleiðis, at tær eru nærri leikvallarøkinum. Í dag eru dysurnar staðsettar soleiðis, at tær ofta koma at standa innan fyri talgildu ljósbandareklamurnar og tí ikki kunnu virka sbrt. endamálinum.

FSF er til reiðar at leggja út fyri verkætlanina, treytað av at FSF og TK gera eina avtalu um, at TK rindar sín part av verkætlanini við seinni høvi. Fyribils metingin av verkætlanini er upplýst í hjálagda fylgiskjali og tá gingið út frá, at lagt verður upp til at útvega allarbestu dygd av graslíkisteppi og gummigranulati. Harumframt er ætlanin at leiga ein nýggjan stórskíggja til stadion.

Eisini er lagt upp til at fáa sett ein fjarhitavekslara til hitaskipanina í vøllinum og soleiðis fáa eina eyka trygd fyri, at týðandi landsdystir kunnu verða spældir størri part av árinum. Ætlanin er at kanna, um sami vekslari kann veita hita til Fimi, B36-húsið og HB-húsið. Mettur kostnaður er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

Samstundis er eisini ynskiligt at kunna bjóða út veitingina av graslíki av báðum verkætlanunum í senn og soleiðis vónandi kunna spara nakað.

**Viðv. fyribils raðfestingum fyri 2021 og 22**
<u>2021</u>
Endurskapan av lendinum og skifting av graslíki við niðara vøll í Gundadali, umframt at gera nýggja ljósskipan til ovara vøll.

<u>2022</u>
Skifta graslíki á Argjum og at fáa nýggja ljósskipan har.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara í samráðingar við FSF um at gera samstarvsavtalu um at skifta graslíki, flyta sprinklaraskipanina á Tórsvølli í 2020, umframt verkætlan við hitavekslara, og at TK rindar sín part í 2021 og 2022 og at venda aftur við eini avtalu til støðutakan.

b). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at fremja pkt. a. og at venda aftur í nevndina við einum úrsliti til støðutakan.

c). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at skifta graslíki á ovara vølli í Gundadali á sumri 2020, umframt gera fyrireikingar til at gera sprinklaraskipan á vøllinum og at venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

d). at heimila umsitingini at samráðast við ráðgevar á Tórsvallar-vesturskýlisverkætlanini (t.e. Sp/f MAP, Sp/f HMP Consult og P/F LBF) um at gera eitt mastrafundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll til eina komandi nýggja ljósskipan við ovara vøll og venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

e). at flyta 5.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle tekur undir við Mantamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at skifta gráslíki á ovara vølli og at fáa ljósviðurskiftini í rættlag í ár og játta neyðuga peningin av konto nr. 6275.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutauppskotið í fíggjarnevndini, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Jan Christiansen og Bergun Kass.

Síðan varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 11/20 Víðka skipanina við ókeypis hallarleigu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 30.01.2020 | 31/20 | 20/00339-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 11/20 | 20/00339-1 |

**Upprunin til málið:**
Annika Olsen, borgarstjóri.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot at lætta fíggjarliga um hjá ítróttafeløgum og sersambondum at brúka ítróttahallir, harundir Svimjihøllin, til venjingar soleiðis, at ítróttarfeløg og sersambond ikki gjalda hallarleigu til venjingar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Galdandi leiðreglur frá 6. juni 2018 áseta, at feløgini, sum lúka treytirnar, ikki skulu rinda hallarleigu sbrt. galdandi prísskrá í tíðarskeiðinum frá 15. august – 1. mai, meðan tey restina av árinum rinda sbrt. galdandi prísskrá.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyri hvønn tíma hesi brúka í kommunalum hallum verður rindað 150 kr./tíman frá kontu 5365 Stuðul til ítrótt til kontu 5717 Ítróttaanlegg. Fyri hvønn tíma hesi nýta í Gundadalshøllini (L/F Venjingarhøllin) rindar stuðulskontan 250 kr./tíman til L/F Venjingarhøllin.

Nýtslan hjá sersambondum o.l. er sbrt. galdandi prísskrá alt árið.

Skipan við stuðli til hallarleigu er ikki galdandi fyri Svimjihøllina kontu 5610, men feløg hava avtalu við kommuna um árligt gjald, ið er lágt sett.

Broytingin
Fyribils verður mett, at broytingin við ókeypis hallarleigu fyri ítróttafeløg og sersambond alt árið vil kosta umleið kr. 700.000 í 2020. Tá er roknað við, at feløgini og sersambondini ikki fullnýta allar tøku hallartímarnar til venjing alt summarið, tí virksemið gjarna er heldur lægri hesa árstíð. Helst verður talan um eina stigvísa tilgongd næstu árini, sum hædd kann takast fyri í komandi fíggjarætlanum.

Fíggjarstøðan hjá Svimjihøllina hevur við sær, at tað fær ongar virksemisavleiðingar, um svimjifeløg sleppa undan gjaldi í ár, men at hædd verður tikið fyri hesum til komandi fíggjarætlan.

Mett verður neyðugt at eftirhyggja verandi leiðreglur um lán og brúk av hallum, eitt nú í sambandi við býtið av hallartímum. Eisini skal støða takast til leigumál hjá øðrum ítróttafeløgum o.l.,. ið ikki eru í vanligum ítrótta- og fimleikahallunum, og sum fáa stuðul til leigu.

Nærri tilmæli av hesum viðurskiftum verða løgd fyri nevnd á seinni fundi í vár eisini saman uppskotinum um ítrótta- og frítíðarpolitikk.

Broytingin hevur við sær, at so siga øll hallarleiga hjá ítróttafeløgum og sersambondum verður ókeypis. Meginparturin av stuðlinum verður, sum omanfyri lýst, í praksis fluttur til

rakstrarkontuna hjá Ítróttaanleggum. Í sambandi við fíggjarætlanina 2021 kundi upphæddin til hallarleigu tí heldur verið játtað beinleiðis til kontu hjá Ítróttaanlegg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta 700.000 kr. av kontu 20910 Aðrar inntøkur til kontu 5365 Stuðul til ítrótt ætlað ókeypis hallarleigu til venjingar hjá ítróttafeløgum og sersambondum alt árið. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 30. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir sum eykajáttan.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 12/20 Grunnurin Williamshús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 307/19 | 19/04348-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 331/19 | 19/04348-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 43/20 | 19/04348-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 12/20 | 19/04348-1 |

**Upprunin til málið:**
Fundur 16.10.2019 við Zacharias Heinesen og Elisu Heinesen, umboð fyri grunnin Williamshús.

**Lýsing av málinum:**
Grunnurin Williamshús varð stovnaður 25.11.2014. Sambært §4 í viðtøkunum fyri grunnin eru 5-8 limir í nevndini:
- tveir nevndarlimir úr familjuni ella næstu vinir,
- stjórin í Norðurlandahúsinum er føddur limur,
- borgarstjórin í Tórshavnar kommunu er føddur limur,
- aðrir nevndarlimir við fakligum og øðrum førleikum so sum leiðslu, nevndararbeiði ella virksemi í grunni.

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu er sostatt nevndarlimur í grunninum. Sambært umboðunum fyri grunnin kann annar býráðslimur umboða kommununa, um kommunan ynskir tað, og viðtøkurnar hjá grunninum kunnu broytast samsvarandi. Zacharias Heinesen er nevndarformaður. Einans ein nevndarfundur hevur verið um árið, tí virksemi er lítið í løtuni.

Nevnast skal, at fundurin við umboðini fyri grunnin snúði seg serliga um urtagarðin og økið kring Williamshús og ynski um samstarv við Tórshavnar kommunu. Tað málið verður lagt fyri mentamálanevndina skjótast gjørligt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Viðtøkur (fundats) fyri grunnin Williamshús. Avrit er hjálagt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki viðkomandi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar.

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar.

**Skjøl**
Avrit av viðtøkunum fyri grunnin Williamshús er hjálagt.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um borgarstjórin skal vera limur í nevndini. Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti**:
Samtyktin 6. november 2019 í nevndini var ikki nóg neyv. Neyðugt er at nevndin ítøkiliga tekur støðu til um borgarstjórin skal vera limur í nevndini!

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Samtykt at borgarstjórin verður limur í nevndini.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 13/20 Gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin, matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 20.05.2019 | 5/19 | 19/01973-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 191/19 | 19/01973-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 143/19 | 19/01973-3 |
| 4 Gøtunavnanevndin | 11.11.2019 | 6/19 | 19/01973-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 325/19 | 19/01973-3 |
| 6 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 300/19 | 19/01973-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 29/20 | 19/01973-3 |
| 8 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 13/20 | 19/01973-3 |

**Lýsing av málinum:**
Byggi- og Umhvørvisdeildin heitir á gøtunavnanevndina um at finna eitt gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin í Havn, sum Tórshavnar kommuna hevur góðkent.
Talan er um matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a. Útstykkingin hevur vegatkomu frá Villingardalsvegnum. Hædd er tikin fyri, at trøðin sunnanfyri, matr. nr. 1344a, kann knýtast uppí útstykkingina.

Kort eru hjáløgd.

**Gøtunavnanevndin 20. mai 2019:** Nevndin mælir til, at gøtunavnið verður «Ryskigøta».

Ryski er planta í sevættini og veksur í haga og fjallalendi. Navnið er kent t.d. í Ryskivatni.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá stjóranum í Sp/f 10.09.2018, sum søkir um, at gøtunavnið verður broytt til *"Fípugøta"*. Skrivið er viðheft.
Í skrivinum stendur m.a.:
"Eigarin metir, at gøtunavnið er torført at siga/úttala hjá nógvum og kann skjótt misskiljast. Tí verður søkt um, at gøtunavnið verður broytt, og vit vóna, at tit ganga ynskjum okkara á møti. Okkara uppskot er, at navnið á gøtuni verður broytt til *"Fípugøta".*"

**Gøtunavnanevndin 11. november 2019:** Samtykt at broyta navnið til «Fípugøta».

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, heldur fast við samtyktina 7. juni 2019.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Annika Olsen skeyt upp at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, heldur fast við samtyktina 7. juni 2019.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælir til navndið «Fípugøta».

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Útsett.

# 14/20 Havnin sum súkklubýur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 58/19 | 19/01370-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 18/19 | 19/01370-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 25/19 | 19/01370-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 308/19 | 19/01370-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2019 | 200/19 | 19/01370-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 20/20 | 19/01370-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 22/20 | 19/01370-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 14/20 | 19/01370-1 |

**Upprunin til málið:**
Marin Katrina Frýdal, forkvinna í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fólkheilsa, umhvørvi, flytføri og fíggjarlig menning – súkkling er ein liður, ella eitt amboð, ið stuðlar undir hesum. Lykilin til eitt gott samfelag er í einum sterkum flytføri, har bilar ikki longur dálka luftina og taka so nógv pláss, sum teir gera nú á døgum. Økta framtíðar ferðslan skal loysast við súkkling, gongd og almennari ferðslu.

Vilja vit súkkling, tosa so ikki bara um súkkling, sigur Gil Penelosa. Tí tað snýr seg um fólkaheilsu, umhvørvi, flytføri og fíggjarliga menning. Súkkling er bara eitt av fleiri amboðum, sum arbeiðir fyri hesum og er ikki eitt endaúrslit í sjálvum sær. Gil Penelosa er stovnari og leiðari fyri almannagagnliga felagsskapinum 8 80 Cities í Toronto í Canada. Hugsanin er, at um ein megnar at skapa ein bý, har gott er at liva hjá bæði 8 og 80 ára gomlum, so er tað ein býur, sum er góður fyri øll.

Tórshavnar kommuna skal miðvíst og yvirskipað leggja til rættis, so Havnin verður ein góður súkklubýur. Strembað eigur at verða eftir, at Havnin gerst ein av heimsins bestu súkklubýum. Havnin er ein eyðsæddur súkklubýur, fjarstøðan er stutt og veðrið er milt. Hóast regn og vind, eru sera góð klæðir til endamálið, og súkklurnar eru sera væl útgjørdar til nógvu brekkurnar við nógvum kervum. Harumframt eru frálíkar el-súkklur eisini komnar á marknaðin. Tað skal vera lætt at velja súkkluna, ið er ein týdningarmikil partur av grøna skiftinum. At skilja súkkluferðslu frá bilferðslu er ein liður í hesi stremban.

Málið skal verða, at súkkling skal fella sum eitt trygt og natúrligt val hjá teimum flestu.

Nógvar gøtur eru gjørdar síðstu árini, sum eisini eru sera væl egnaðar at súkkla á, eins og breiðar gongubreytir nú verða strikaðar eftir heimildini, kommunan loksins hevur fingið; *Kunngerð nr. 138, Um súkklandi á gongubreytum, frá 19. oktober 2017*, soleiðis at bæði gongufólk og súkklandi kunnu nýta gongubreytirnar.

Skal Havnin skara framúr, sum ein veruligur súkklubýur, har súkkling er ein valmøguleiki hjá øllum, skal tað verða trygt, lætt og skjótt at súkkla. Lykilin er útbygging av eini samanhangandi súkkluleið, har ikki er neyðugt at stíga fótin niður á fast og har súkkling í mestan mun er atskild frá bilferðsluni.
Neyðugt er at gera bæði smá og stór átøk. Langtíðarætlanir verða lagdar í kommunu-/miðbýarætlanir, byggisamtyktir og í øllum skipanararbeiði.

**Uppskot til átøk at gera beinanvegin - *skjótt syftir seiðir*:**

1. Skráar verða gjørdir á øllum mótum, har gongubreytir/súkklubreytir enda á vanligum vegi o.tíl.
2. Súkkluparkering í miðbýnum, t.v.s. súkkluhús við streymi til el-súkklur, pumpu, skiftilykil o.ø. hentleikum - súkklur skulu standa trygt og turt.
3. Súkklur við í bussarnar.
4. Eggja til súkkluvinarlig arbeiðspláss – heilsufremjandi – lønandi – umdømi.
5. Eitt gott samanhangandi, lagaligt og væl útbygt ferðslutrygt súkklunet.
6. Kunning um súkkluleiðir við m.a. at gera betri kort til heimasíðuna, ið vísir hvar súkkluleiðirnar eru í býnum og millum Havnina og bygdirnar.
7. Áherðslu á heilsuliga týdningin á gerandisliga súkkling fyri øll.

**Uppskot um langtíðarætlað átøk:**

1. Súkkling við í kommunu-/miðbýarætlanir, byggisamtyktir v.m.
2. Allir nýbygningar skulu hava súkkluskúrar og atknýttar súkkluleiðir, sí j. nr. 2005-1437 og 2005-1436.
3. Við allar skúlar, dagstovnar og kommunal arbeiðspláss verða gjørd súkkluhús við hentleikum nevnd omanfyri.
4. Í útjaðaranum verða skipað súkkluparkering eins og í miðbýnum, t.v.s. súkkluhús við streymi til el-súkklur, pumpu, skiftilykil o.ø. hentleikum - súkklur skulu standa trygt og turt. Soleiðis at fólk, ið ferðast til og frá arbeiði, antin við Bygdaleiðum ella Bussleiðini, kunnu súkkla síðsta teinin.
5. Skipað fyri tiltøkum, sum kunnu vekja áhugan fyri at súkkla.

Ein súkklubýur er ein býur við meira plássi, minni larmi, reinari luft, glaðum og nøgdum íbúgvum. Súkkling er ikki eitt mál í sjálvum sær, men er hinvegin ein munagóður miðil til at skapa ein betri bý at liva í við plássi til fjølbroytni og menning.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í sambandi við striking av gongubreytum: *Kunngerð nr. 138, Um súkklandi á gongubreytum, frá 19. oktober 2017.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hetta er eitt sera breitt og umfatandi mál/átak, og eigur hetta at verða samskipað millum deildir og fyrisitingar á bestan hátt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ætlanirnar hjá Teknisku deild og Umhvørvisdeildini at strika gongubreytir (Rakstrar mál).

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-
**Umhvørvisárin**
-
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-
**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar** | **Fyri ávís økir í** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | kommunu | kommununi | ella felagsskapir | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | x | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ein arbeiðsbólkur verður settur við umboðum frá Býarskipanardeildini, Teknisku deild og Umhvørvisdeildini at nágreina ítøkiligu átøkini, sum verða, í omanfyri nevnda teksti, lýst sum *Skjótt syftir seiðir*, at arbeiðisbólkurin tryggjar sær luttøku frá øðrum fyrisitingum, sum kunnu verða rakt av ella sum onkursvegna hava ein áhuga í verkætlanini, og at arbeiðsbólkurin vendir aftur í nevndina við eini ætlan fyri hvussu átøkini skulu raðfestast, fíggjarligu avleiðingunum av átøkunum og eini tíðarætlan fyri nær átøkini kunnu verða framd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Ískoyti:**

**Súkkling sum ítrótt og frítíðarvirksemi**
Í Tórshavnar kommunu eru trý súkklufeløg t.e. Tórshavnar Súkklufelag, Føroya Triathlonfelag og Fjallasúkklufelagið, ið eru skipaði undir Sersambandinum fyri Súkkling og triathlon, ið er limur í ÍSF

Í Tórshavnar Súkklufelag eru umleið 20 virknir limir. Í Føroya Triathlonfelag eru umleið 20 virknir limir og í Fjallasúkklufelagnum eru umleið 20 virknir limir. Onki súkklufelag er í løtuni virkið uttanfyri høvuðsstaðin.

Nakað av samskifti hevur verið við feløgini, ið m.a. ynskja sær høli til goymslu og felagsvirksemi. Harumframt hava feløgini verið partur av konseptmenningartilgongdini viðv. frítíðardepli á Glyvursnesi (Mál 18/03472 Forkanningar viðv. staðseting av ymsum frítíðarvirksemi í grótbrotinum á Glyvursnesi), umframt hugskot til menning av innandura súkkluforðabreyt til at venja motorikk v.m. Eisini er súkkling partur av tilgongdini í máli 19/00757 Ítróttapolitikkur fyri Tórshavnar kommunu. Umframt verkætlanin í máli 15/03842 Fjallasúkklufelagið: Umsókn um lendi til fjallasúkklurás.

Ætlanin er at halda fram við samskiftinum við feløgini um menning av virksemi og fyrireika møgulig mál til nevndarviðgerð.

**Spurnakanning um súkkling v.m.**

Umsitingin hevur júst fingið gjørt eina spurnakanning viðv. súkkling v.m. í kommununi. Hjálagda kanning sýnir at eitt stórt potentiali er í at fáa fleiri fólk at súkkla meiri, eisini sum ítrótt og frítíðarítrótt og at menna karmarnar fyri tí. Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga úrslitini í kanningini.

**Skjøl:**
*Úrslit frá súkklukanning*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða kanningina við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmælum í vetur.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2020 er játtað 1.000. tkr á konto 6275 Fríðkan av kommununi, til at seta í gongd átøk í mun til ætlanina «Havnin sum súkklubýur», merking, broytingar í vegakervi og súkklutiltøk.

Arbeiðsbólkurin við umboðum úr býarskipanardeildini, teknisku deild og umhvørvisdeildini hava gjørt uppskot til ymisk samansett átøk at seta í verk í 2020. **Sí skjal 19/01370-22 Súkkluárið 2020.**

Átøkini snúgva seg um betringar fyri súkkling í vegakervinum, betri umstøður fyri súkkluparkering og tiltøk av ymiskum slag, sum varpa ljós á súkkling og burðardygga ferðslu, ið hava góða ávirkan á heilsu, trivnað og umhvørvi.
Átøkini verða gjørd í samstarvi við avvarðandi myndugleikar, felagsskapir, áhugabólkar og virki, sum kunnu luttaka í menningini av Havnini sum súkklubýur.

Átøkini í yvirlitinum súkkluárið 2020 setur ferð á tilgongdina at menna Havnina og leggur eisini lunnar undir framhaldandi arbeiði, hvussu súkkling og burðardygg ferðsla skal raðfestast í kommununi komandi árini.

**Skjøl:**
*Súkkluárið 2020,* journal nr. 19/01370-22

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til

- at játta 1.000. tkr. av konto 6275, *Fríðkan av kommununi (súkklugøtur og skýli)*, L00001, Løgukarmur fyri árið,
- til nýggja verkætlan “Havnin sum súkklubýur”, ið fevnir um at fremja átøkini sum lýst í yvirlitinum Súkkluárið 2020, umframt at geva arbeiðsbólkinum heimild til at seta átøkini í verk.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 15/20 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 177/18 | 17/02247-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 56/18 | 17/02247-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 74/18 | 17/02247-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 251/18 | 17/02247-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 374/18 | 17/02247-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 358/18 | 17/02247-1 |
| 13 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 320/18 | 17/02247-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 17/19 | 17/02247-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 153/19 | 17/02247-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 242/19 | 17/02247-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 278/19 | 17/02247-1 |
| 18 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 250/19 | 17/02247-1 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 13/20 | 17/02247-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 21/20 | 17/02247-1 |
| 21 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 15/20 | 17/02247-1 |

### Lýsing av málinum – samandráttur

Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

### Gøtan millum bý og hav

Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

**Fiskastykkið**

*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

"Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús "ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus..." Byggiloyvið varð latið honum (Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.*
*Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti – kunning um verkætlanina:**
Fundur hevur verið við Ólav Frederiksen, formann hjá Føroyskum Radioamatørum,
um at fara í holt við at rudda fiskastykkið og at bjóða økið út til uttanhýsis ráðgeva at koma við uppskoti til, hvussu økið kann gerast til eitt uppihaldsstað, har ljós er varpað á søguna á økinum.
Sambært Ólav hevur felagið onga stórvegis útgerð á fiskastykkinum, og verkætlanin fer ikki at ávirka virksemið hjá felagnum. Ólavur viðmerkir tó, at tað hevði verið tryggast, um onkur forðing varð gjørd millum fiskastykkið og restina av matriklinum, soleiðis at vitjandi ikki fara inn á økið, har allir káplarnir liggja. Sí Fundarfrásøgn Fiskastykki, journal nr. 17-02247-25.

Umsitingin hevur móttikið skipanaruppskot til, hvussu fiskastykkið kann koma at síggja út og uppskot uppá hvussu verkætlanin kann býtast upp í átøk og byggistig frá ráðgeva EYA v/Eyðun Eliasen. EYA hevur tillagað uppskotið eftir kunning frá Ólavi sí Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, journal nr. 17-02247-26.

**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Uppskotið fevnir um økið frá norðanfyri vegnum móti campingøkinum og vegnum út á Bukkvald og suðurum lítlu "víkina" við matrikulmarkið (sí s. 12 í uppskotinum). Í skipanaruppskotinum verður mælt til at byggja uppá og fríðka um verandi øki við at:

- leggja tilfar afturat verandi rúgvu av mold, grasi o.l. fyri at gagnnýta økir við lívd, útsýnislinjum og sólargangi.
- reinsa og á summum støðum umvæla steinsetingina á Fiskastykkinum.

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at geva vitjandi á fiskastykkinum best møguligu lívd. Uppskot er tí um at gera tvey innvik í skulpturellum skapi, sum vitandi kunnu uppihalda seg í. Innvikini verða skorin inn í steinlaðingina og helluna á Fiskastykkinum. Fyri at fólk skulu trívast á einum útiøki sum hesum, er týdningarmikið at økið ikki er ov vítt. Tí er dentur lagdur á at gera "verjugarðar" móti vestri, norðri og eystri á ovara partinum av fiskastykkinum. Eftir at økið er ruddað og nærri skrásett, verður støða tikin til, hvussu langt suðureftir tað broytta fiskastykkið skal fara. Skráarnir á økinum verða klæddir við timburbrettum, so hallið ikki verður ov stórt. Hetta ger tað eisini møguligt at skapa eina farleið, sum kann knýtast at ætlaðu 'Gøtuni kring Havnina'.
Uppskotið fevnir eisini um at gera parkeringsøkið har sum Reinhaldið heldur til í dag og at nýta asfaltrúgvuna móti sjónum til at geva lívd.

Harafturat verður eitt ítøkiligt átak skotið upp, ið snýr seg um at umskapa bygningin á ognini til endamál, sum hava tilknýti til fiskastykkið ella líknandi evni. Talan kann vera um eitt savn við framsýningum um fiskavinnu og –yrki og/ella eina matstovu, sum borðreiðir við saltfiskavørum. Hugskotið er sera áhugavert, men umsitingin metir, at tað verður torført og

sera dýrt fyri Tórshavnar kommunu at flyta føroyskar radioamatørar, ið leiga matrikulin, á annað øki. Leigusáttmálin millum Føroyskir Radioamatørar og Tórshavnar kommunu er galdandi til 2029. Sambært Radioamatørunum eru káplar blivnir lagdir á lendið gjøgnum eitt langt áramál, og eru sera nógvir arbeiðstímar lagdir í hetta arbeiði. Káplarnir liggja sum eitt eiturkoppanet á einum stórum parti av økinum, og tað er nærum ómøguligt at flyta ella taka káplarnar uppaftur.

Uppskotið fevnir um 8 byggistig (sí s. 17 í uppskotinum). Umsitingin mælir til, at farið verður ígongd við at bjóða byggistig 1, 3, 4 og 8 út til ávikavist ráðgeva og tilboðsgeva at menna. Sí byggistig niðanfyri.

1. Skráseta økið neyvari fyri møguligar leivdir, lutir o.a.

3. Rudda alt økið. Fyrst leyst tilfar og órudd og síðan mold og óegnað gróttilfar o.a.

4. Gera og góðkenna endaligu verkætlanina og fáa loyvi frá friðingarmyndugleikum.

8. Bukkvald-verkætlanin gerast so hon eisini gerst ein natúrligur partur av økinum.

Umsitingin fer í næstum at finna nýggja staðseting til Reinhaldið.

**Skjøl:**
Fundarfrásøgn Fiskastykki, Journal nr.17-02247-25
Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, Journal nr. 17-02247-26

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **x** | **x** | | **x** |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | **x** | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **x** | | | **x** |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður uppskotið uppá verkætlanina og beinir málið í teknisku nevnd til kunningar, umframt at umsitingin fer undir at seta ymisku átøkini í verk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti – nýggj staðseting til Reinhaldið**

Saman við teknisku deild hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot um nýggja staðseting til umlastuplássið hjá reinhaldinum í Gundadali.

Smáu feiu-bilarnir eru ikki egnaðir at koyra langar teinar, og arbeiðsfólk við trillubøru skulu sleppa av við ruskið uttan at skula ganga ov langt, tí er týdningarmikið at nýggja staðsetingin er nærhendis miðbýnum. Hugskotið er at savna øll umlastuplássini hjá reinhaldinum í Gundadali. Hetta merkir, at umlastuplássini á Skálatrøð og á Bukkvald verða flutt, og at hesi øki tí eisini verða tøk til framtíðar verkætlanir.

Uppskot upp á staðseting í Gundadali eru gomlu vaskiplássini hjá bilstøðini Bil, sum Tórshavnar kommuna er eigari av. Neyðugt verður at tillaga plássini til bingjur og gera vaskipláss við oljuútskiljara. Ein gamal oljuútskiljari er á plássinum, men um hesin kann brúkast má eftirkannast. Um tangin ikki kann brúkast, kann oljutangin á Bukkvald blíva tikin upp og staðsettur í Gundadali. Fólk frá Tórshavnar kommunu er frammanundan í Gundadali og rudda aftaná landsdystir og sunnudagsdystir. Tí er upplagt, at sameina hetta virksemið við umlastuplássið hjá Reinhaldinum og skipa alt hetta í Gundadali.

Fyri at plássið skal verða til so lítlan ampa fyri grannar, virksemi og vitjandi á økinum sum gjørligt, er neyðugt at gera ein uml. 2 m høgan garð uttan um plássið. Plássið liggur beint uppat einum grønum kliva av runnavøkstri, og tí vildi tað verið upplagt at plantað runnar uppat garðinum, soleiðis at plássið verður betri sameina við verandi øki. Sum sæst á Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf journal nr. 17/02247-30, rennur Havnará vestan fyri plássið og mælt verður til at plássið verður flutt 2,5 m eystureftir burtur frá ánni og 0,5 m frá vegnum. Fyri at sleppa undan at hava inn- og útkoyring frá Gundadalsvegnum, verður mælt til at eitt automatiskt portur verður sett á eystaru síðu av plássinum, soleiðis at feiu-bilarnir kunnu koyra inn millum bingjurnar til tøming og vaskiplássið og at lastbilur kann koyra inn fyri at heinta bingjurnar. Samanlagt verður plássið uml. 250 fermetrar.

Kostnaðurin fyri at fyrireika verandi pláss á Bukkvald var uml. kr. 350.000. Av hesum plássi kann oljuútskiljari og skúrur brúkast aftur í Gundadali og harafturat kemur so garðurin.

**Skjøl:**
17/02247-30 Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekurin mæla til at samtykkja nýggja staðseting av umlastistøð til reinhaldið í Gundadali, at játta 350.000 kr. av L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið til flytan av verandi umlastistøð Yviri við Strond niðan í Gundadal, at beina málið í mentamálanevndina til kunningar og síðani í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri at koma víðari við ringrásini/gøtuni kring Havnina og kunna byrja uppá strekkið Yviri við Strond, er neyðugt at fara í samráðingar við traðareigararnar (matrikuleigarar), umframt leigararnar av kommunalu stykkjunum.

Størsti partur av matriklunum Yviri við Strond er privatogn, tí verður viðmælt, at hvør einstaki eigari verður innkallaður til ein kunnandi fund við tí fyri eyga at finna eina loysn, ið báðir partar kunnu semjast um.

Væntast kann, at samráðingartíðin verður nakað drúgv. Væntast kann somuleiðis, at ikki allir matrikuleigarar eru eins jaligir fyri tankanum, um at fáa eina gøtu ígjøgnum teirra lendi, og kunnu tí spenna føtur fyri ætlanini ella krevja endurgjald fyri miss av lendi.

**Samandráttur av uppskotið frá SNA:**
Fyri jól lat umsitingin SNA uppgávuna at gera uppskot til staðseting av gøtuni frá Skansanum yvir til Boðanes, umframt staðsetingina skuldi uppskotið fevna um snið av gøtuni.

Uppskotið frá SNA fevnir um strekkið Yviri við Strond, og verður gøtan á hesum strekkinum kallað Strandargøtan. Gøtan strekkir seg góðar 2,5 km frá Skansanum og til Boðanes.

Uppskotið leggur dent á, at Strandargøtan leggur seg eftir landslagnum og er staðsett á markinum millum fjøruna og bøin. Hetta fyri at geva tí vitjandi møguleika at uppliva náttúruna, bøin, fjøruna og brúsandi havið.

Gøtan í sær sjálvum vísir á, at tað menniskjaliga er tilstaðar í økinum, millum land og hav. Hetta sæst aftur í støddarlutfallinum á gøtuni, har mát sum favnur, alin, føtur og tummar verða nýtt gjøgnum alla gøtuna. Hetta styrkir tankan um at gøtan er ein menniskjansskapur bulur, ið er skolaður uppá land, samstundis sum at gomlu máteindirnar verða varðveittar.

Tilfarsvalið verður rátt og einkult, sjálv gøtan kemur at liggja sum ein betong strukturur við eini stálrammu/veggi, men har verða økir, ið verða meir rúmlig og viðgjørd úr øðrum tilfari, so sum timbur, innstoyptir flísar í ymiskum litum og ljósi.

Ynski er, at gøtan minst møguligt er til ampa fyri lendið, tí kemur betongflísin at hava føtur, ið kunnu javnast eftir lendinum, haraftrat verða ljós innleggingar gjørdar, so gøtan verður upplýst.

Á strekkinum verður tann vitjandi kunnaður um áhugaverd støð á strekkinum, har tað er upp lagt at steðga á, og verða hesi steðgiplássini gjørd við bonkum til lívd, kagstøðum, brúgvum o.ø.
Dentur er lagdur á at uppliva skifti í landslagnum, sum at fara frá fjøru til hellu, vøkstur o.a. hetta sæst aftur í sjálvari gøtuni við at ymiskt tilfar verður nýtt sum bindiliður á gøtuni.

Sambandið oman til Strandargøtuna er raðfest við at leggja smáar gøtur úr løgasteinum ígjøgnum summar traðir.

**Fiskastykkið**
Ráðgevarafyritøkan EYA arbeiðir við fiskastykkinum, og í løtuni eru tey í samráðingum við Tjóðsavnið, har uppruna uppskotið verður tillagað. Meir kunning um verkætlanina Fiskastykkið kemur seinni.

**Átøk:**
Neyðugt er at fara í samráðingar við matrikuleigararnar fyri at finna eina loysn, ið hóvar øllum pørtum. Síðani skal Strandargøtan projekterast og setast í verk.

**Skjøl:**
- *Strandargøtan síður A3 print, journal nr. 17/02247-37*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at byrja samráðingar við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, fyri síðani at koma aftur í nevndina við einum ítøkiligum úrskurði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skráseting av djóra og plantulívi:
Umsitingin hevur havt fundir við Tjóðsavnið um verkætlanina, og eru komin ásamt um at gera eina skráseting av djóra- og plantulívi á økinum, har gøtan er ætlað. Skráseting av djóralívi verður í eitt ár, og plantuskrásetingin á vári og summari.
Við hesum kann metast um møgulig umhvørvisárin av gøtuni sum frálíður.
Báðar kanningarnar eru farnar í gongd og er avtalað við Tjóðsavnið, at hava ein støðufund í vetur um gongdina, og innkomin úrslit av skrásetingini.

Gøtan kring Havnina:
Umsitingin hevur á vári í 2019 verið í samráð við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, og greitt teimum frá ætlanunum, ið Tórshavnar kommuna hevur í økinum. Samráðingarnar hava gingið væl og samanumtikið hevur undirtøkan verið positiv. Viðmerkingar av ymiskum slagi hava verið, og eru tær tiknar við í víðari viðgerðina av málinum.
Uttanhýsis ráðgevi hevur gjørt uppskot til loysn av elementum, sum skulu byggjast framvið sjóvarmálanum sum gøta.

Royndarverkætlan:

Ætlanin er gera element at byggja gøtuna upp við. Loysnin við elementum ger tað, at lendisviðurskiftini í fjøruni verða órógvað sum minst. Tilfarið av elementunum verður ymiskt, alt eftir hvussu økið er.
Í fyrsta umfari er ætlanin at gera eitt strekki við 3 ymiskum royndarelementum á matr.nr. 651l og 651b, so elementini kunnu roynast í ein vetur, og loysnin kann eftirmetast, áðrenn farið verður víðari.
Matr.nr. 651l og 651b, er ogn hjá Tórshavnar kommunu og verða nýtt til parkering. Royndarelementini verða lætt atkomilig, og koma ikki at órógva verandi virksemi á økinum.

Arbeiðstakarar eru ikki áhugaðir at geva tilboð uppá royndarelementini, men mett verður, at royndarelementini kunnu framleiðast og monterast á staðnum fyri 0,6 mió. kr.

### Skjøl:
*17/02247-37 Strandargøtan síður A3 print*
*17-02247-76 K100_Betongelement_strandagøta*
*17-02247-76 gøta skitsa*
*17-02247-76 gøta perspektiv*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta fyribils ætlanina við gøtuelementum í verk,
- at játta 0,6 mió. kr. av konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið,
- at heimila umsitingini at seta royndarverkætlanina í verk
  og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at arbeiðið ikki er boðið út.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2020 eru játtaðar 5.000. tkr á konto 6275 fríðkan av kommununi.
Royndarelement til gøtuna kring Havnina eru prosjekterað, boðin út og verða framleidd og sett upp í næstum. Fyrsta stig við rudding av Fiskastykkinum er liðugt, og skal næsta stig setast í verk. Næsta stig er skurður í lendi, umvæling av lagingunum og atkomuviðurskifti til Fiskastykkið, sum verða sett í verk í samstarvi við ráðgeva og Tjóðsavnið.

Liðugtprosjektering av konstruktiva partinum av útsýnispallinum á Bukkvald skal setast í verk, og arbeiðið hareftir bjóðast út.

**Bindingar í lendi**

Løgfrøðilig ráðgeving ísv lendiseigarar og leigarar verður tikið uppaftur í sambandi við framhald av gøtuni.

Leigusáttmálin við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør er galdandi inntil 2029. Býarskipanardeildin hevur samskift við Radioamatørarnar um hetta, og er semja um, at virksemi hjá teimum eigur at verða flutt, tá ið Fiskastykkið og Gøtan kring Havnina verður tikin í nýtslu sum alment brúksøki. Ynskiligt er tí, at nýggj staðseting verður funnin, so teir kunnu byrja at fyrireika seg til at flyta av økinum skjótast til ber.

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 2.500 tkr. til framhald av ætlanini um gøtuna kring Havnina, Fiskastykkið og Bukkvald av løgukarminum konto 6275, fríðkan av kommununi, á projektkonto L62032, Gøtan Kring Havnina, Fiskastykkið, og at geva býarskipanardeildini heimild at seta arbeiðið í verk.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:**

Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipananevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 16/20 Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 16/20 | 19/04022-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 16/20 | 19/04022-2 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 804a og 795l, Tórshavn, hevur vent sær til kommununa við nýggjum ætlanum um íbúðarbygging í økinum.

Ein serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging varð í 2015 samtykt fyri økið, men ymisk viðurskifti gera, at tann ætlanin er slept.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin er framvegis at byggja íbúðir í økinum, men sniðið og skipanin av hesum er øðrvísi enn upprunaliga ætlað, og mett verður, at nýggja ætlanin hóskar seg betur inn í økið.

Byggingin er skipað sum 6 býlingar, við íblástri úr Føroysku byggi siðvenjuni. Hvør býlingur hevur 6 íbúðir, 3 ymisk snið, og eru hesar bygdar kring eitt felags tún. Bygningarnir, sum venda móti sunnan, eru lægri enn bygningarnir, sum venda móti norðan, fyri at tryggja góð ljósviðurskifti í túnunum.

Hæddirnar og byggingin annars er fyri tað mesta sambært ásetingunum um bygging í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Einasta frávikið eru síðurnar, sum venda inn móti túnunum, á teimum hægru bygningunum, sí "útvegg B" á fylgiskjali 3 í serstøku byggisamtyktini. Av tí at hesar síðurnar venda inn móti túnunum og soleiðis ikki ávirka økið rundan um, verður hetta tó mett vera ráðiligt.

Matr. nr. 804a og 795l liggja við Dalavegin og bygging, sum er í økinum umkring, er sethús, raðhús, vinnubygningur og almennur stovnur. Økið er deilt í tvær høvuðsfløtur, har vestari minni parturin liggur nakað hægri enn eystari parturin av økinum. Frá ovara parti av økinum er gott útsýni oman yvir miðbýin, eysturbýin, eystur í hav og suður í fjørðin.

Staðsetingin av býlingunum í lendinum er í ein ávísan mun gjørd soleiðis, at húsini norðan fyri økið varðveita útsýnisgeirar, umframt at grøn øki verða varðveitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Uppskot um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki, frá A3 til A1, liggur til almenna hoyring, sí mál 19/04020.

Ásetingar fyri A1:
*§5. Ásetingar fyri umráðisparararnar A1 í 3. Grundumráði*

*Stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri, vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

*Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*

*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*

*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn,* journal nr. 19/04021.

Av tí at ætlanirnar um at skipa økið sambært galdandi serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn eru sleptar, og nýggju ætlanirnar eru so nógv øðrvísi enn upprunaligu ætlanirnar, verður viðmælt, at galdandi serstaka byggisamtyktin fyri økið verður avtikin, og nýggj verður gjørd, sum samsvarar við nýggju ætlanirnar.

*Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 804a, Tórshavn, frá A3 til A1,* journal nr. 19/04020.

Matr. nr. 804a, Tórshavn varð broytt frá A1 øki til A3 øki 30. oktober 2014, tá ætlanir vóru um at byggja íbúðir í økinum. Táverandi almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu loyvdi ikki íbúðarbygging í A1-øki, men almenna byggisamtyktin er síðani broytt, so til til ber at byggja íbúðir í A1 øki. Harumframt fevnir nýggja ætlanin somuleiðis um matr. nr. 795l, sum liggur í A1 øki, og tískil verður tað mett vera ráðiligt, at broyta alt A3 økið til A1 øki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá teknisku deild til ferðsluviðurskiftini:
*"Bygging á hesum økinum hevur fyrr verið viðgjørd, hendan var tá eisini hjá Bústøðum.*
*Tá varð hildið, at einki skuldi veri til hindur fyri at binda í Dalavegin á hesum støðum, eisini verður mett, at ferðslan til og frá økinum verður rættiliga avmarkað.*
*Verða viðurskiftini viðvíkjandi útsýninum frá hesum vegamótum sambært galdandi reglum, skuldu ferðsluviðurskiftini ikki veri til hindurs fyri hesi ætlan."*

Tekniska deild arbeiðir við at dagføra kloakkina við Dalavegin.

**Skjøl**

*Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 795l og 804a, Tórshavn* – journal nr. 19/04022-8.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt fyri Dalavegin, matr. nr. 804a og 795l, Tórshavn og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 17/20 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 15/20 | 19/04118-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 17/20 | 19/04118-2 |

**Upprunin til málið:**
Á býráðsfundi hin 16. mai 2019 varð samtykt at geva tilsøgn til, at vindmyllur kunnu byggjast í Flatnahaga, m.a. treytað av at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri økið, tá greitt var, hvør hevði vinnandi boðið, sí mál *Lendi til vindmyllulund.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Útbygging av grønari orku minkar um brúk av dálkandi orkukeldum og mett verður, at tað er hóskandi at seta fleiri vindmyllur í øki, sum frammanundan hevur vindmyllur.

Ætlanin er at seta 6 vindmyllur av slagnum Enercon E82 upp í økinum. 76 m eru upp til tornið á hesum og breiddin á veingjunum er 82 m. Soleiðis eru tær nakað størri enn vindmyllurnar í Húsahaga, sum eru 67 m.

Økið, sum ætlanin er at seta vindmyllur á, er sambært kommunuætlanini ikki partur av býarvakstrarøki áðrenn 2030. Tó kann hugsast, at økið sum frálíður verður partur av býarvakstrarøki. Tryggjast má, at økið kann inndragast aftur, og at umsøkjari ruddar alla útgerð og bygging av økinum, um Tórshavnar kommuna hevur aðrar ætlanir á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Øki liggur í 4. Grundumráði, sum m.a. hevur hesar ásetingarnar:

*§ 26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 1, pkt. e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.*

*Pkt. f. Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 25, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á økinum í Flatnahaga er teknisk útgerð, sum Arktisk Kommando hevur ræði á, og leigusáttmála á lendinum. Tryggjast má, at vindmyllulundin ikki órógvar virksemið hjá Arktisk Kommando, ella at onnur loysn verður funnin.

Ein dynamitgoymsla er í økinum í Flatnahaga.
Tryggjast má, at virksemi á økinum ikki gongur útyvir trygdina av goymsluni. Um hetta ikki kann tryggjast, má onnur loysn til dynamitgoymslu finnast.

Gomul ríðigøta er í økinum, og skal framvegis kunna brúkast.
Til ber at umleggja ríðigøtuna í samstarvi við reiðfólk. Smb umsøkjara, er ongin trupulleiki um ríðigøtan fer ígjøgnum vindmyllulundina.

Byggisamtyktarøkið heldur seg uttanfyri friðingarlinjuna fram við Sandá.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Forsvarsministeriets Ejendomsstyrelse: Fyrispurningur vegna SEV um uppsetan av fleiri vindmyllum á Bøllureyni,* journal nr.19/01460.
- *Lendi til vindmyllulund,* journal nr. 19/01609.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild:
- Møguleikin fyri óhappi, og at dálking kann ávirka vatngóðskuna í byrgingini í Havnardali er lítil. Vandin er størri í byggifasuni, enn tá ið projektið er liðugt. Vandin liggur í, at olja so ella so kann seta oman í vatnbrunnin. Mælt verður til at nýta sama atlit móti møguligari dálking, sum var nýtt tá fyrra vindmyllulundin var gjørd.
- Mett verður, at tað er nøktandi við einum vegi, sum er 4 m breiður.

Málið er sent til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum. Náttúrufriðingarnevndin hevur givið loyvi, men bíða verður eftir endaligum loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.

Málið hevur verið til hoyringar hjá Landsverki, sum ikki hevur nakra viðmerking til íbindingina.

Umsøkjari samskiftir við Forsvarsministeriets Ejendomsstyrelse um møguleikan fyri at hava vindmyllulund í sama øki sum antennurnar.

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga,* journal nr. 19/04118-10.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga, treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk, og at ein avtala fæst við Forsvarsministeriets Ejendomsstyrelse og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

# 18/20 Kanning um økt samstarv millum Kommunalu Brennistøðina og IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 22.03.2018 | 17/18 | 18/01200-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 103/18 | 18/01200-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 104/18 | 18/01200-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 17/19 | 18/01200-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 25.11.2019 | 55/19 | 18/01200-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.12.2019 | 58/19 | 18/01200-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.01.2020 | 3/20 | 18/01200-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 18/20 | 18/01200-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunala Brennistøðin (KB) hjá Tórshavnar kommunu og IRF samstarva um ymiskt á burturkastsøkinum, eitt nú pappír og papp, skrottviðgerð av bilum, flogøsku, spillolju v.m. Sum tað seinasta hava KB og IRF eisini gjørt samstarvsavtalu um tyrving og rottangaevju.

Samstarvið millum KB og IRF virkar væl, og metir umsitingin hjá Tórshavnar kommunu, at nógvir fyrimunir og 'synergieffekter' eru við samstarvinum ímillum hesar báðar partar.

Umsitingin í Tórshavnar kommunu og IRF ynskja tískil at kanna møguleikarnar fyri enn meiri samstarvi á burturkastsøkinum. Eisini ynskir umsitingin at kanna eina møguliga samanlegging millum KB og IRF, og hvat hetta inniber við atliti til fíggjarlig viðurskiftir, framtíðar karmar á burturkastsøkinum og leiklut/ávirkan hjá Tórshavnar kommunu í einum øktum samstarvi/samanlegging við IRF.

Ætlanin er, at umsitingin hjá Tórshavnar kommunu og IRF saman við ráðgeva lýsa nevndu viðurskiftini og leggja fyri nevnd aftur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at umsitingin í Tórshavnar kommunu saman við IRF og ráðgeva kannar møguleikarnar fyri meira samstarvi, herundir møguligari samanlegging av Kommunalu Brennistøðini og IRF, at leggja fyri nevndina aftur.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 22. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Kunnað varð um málið og beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Seinasta árið hava Tórshavnar kommuna (TK) og IRF verið í eini samstarvstilgongd við tí endamáli at kanna møguleikarnar fyri, at Kommunala Brennistøðin og burturkastøkið annars hjá Tórshavnar kommunu verður ein partur av IRF.

Í 2018 og 2019 hava fleiri samráðingarfundir verið við IRF, har partarnir hava umrøtt og viðgjørt eina samanlegging av KB og IRF. Tilgongdin hevur verið at skipa fyri ymiskum fundum um øll viðurskifti, sum viðvíkja karmum, virksemi og framtíðarætlanum hjá KB og IRF. Tað hevur verið sera umráðandi at fáa lýst neyvt øll viðurskifti og treytir fyri eini møguligari samanlegging.

Samanumtikið meta báðir partar, at ein samanlegging av KB og IRF gevur góða meining fyri endurnýtslu- og burturkastøkið í Føroyum, sum sostatt verður rikið av einum felagi. Fleiri orsøkir eru til hetta, sum víst verður á í skjølum, sum hoyra til málið.

Ávegis í hesum samráðingunum millum TK og IRF, hava kunningarfundir verið um arbeiðið fyri nevndarlimum í náttúru- og umhvørvisnevndini, samgonguni og býráðnum í TK. Í mars mánað hevur IRF somuleiðis verið á kunningarferð í øllum landinum fyri at kunna teirra limakommunur um viðurskiftini í sambandi við eini samanlegging av KB og IRF.

**Lýsing av samanleggingini**
Víst verður til skjal 1. *Lýsing av samanleggingini*, sum yvirskipað lýsir arbeiðið, sum eru komið burtur úr samráðingunum millum TK og IRF. Í skjalinum er fyrst ein lýsing av virkseminum hjá KB og IRF.

Síðan verður víst á núverandi samstarv millum KB og IRF, sum hava samstarvað í stóran mun yvir nógv ár, um endurnýtslu, bilvrak, spillolju, brenning o.s.fr., eins og partarnir í løtuni samstarva um at gera felags tyrvingar- og rottangapláss í Kvívík (sí skjal 9. *Tyrvingar- og rottangapláss í Kvívík*).

Í skjali 1. *Lýsing av samanleggingini* verður at enda  víst á orsøkir og fyrimunir í eini samanlegging av KB og IRF, sum eru av bæði fíggjarligum og rakstrarligum slagi. Ein talva yvir fíggjarlig viðurskiftir hjá TK vísir, hvør kostnaðurin er fyri burturkastsøkið hjá TK í verandi líki og hvør kostnaðurin verður aftaná eina samanlegging.

**Uppskot til avtalur**
Grundað á samráðingarnar, sum hava verið, eru IRF og Tórshavnar kommuna vorðin samd um ítøkiligar avtalur í sambandi við eina samanlegging av KB og IRF. Hetta er:
1) avtala um treytir og viðurskifti í sambandi við limaskap hjá Tórshavnar kommunu í IRF. Sí skjal 2. *Avtala limaskapur TK*.
2) avtala um keyp av ognum (t.e. brennistøð, leysafæ og lendið) hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við yvirtøku av KB. Sí skjal 3. *Avtala ognir TK*.
3) Partaeigarasáttmáli viðvíkjandi P/F Fjarhitafelagnum. Sí skjal 4. *Partaeigarasáttmáli – Fjarhitafelagið 22-03-2019*.

Hesi trý skjøl eru grundarlagið fyri eini samanlegging av KB og IRF.

Somuleiðis krevur samanleggingin broytingar í viðtøkunum hjá IRF, sum skulu samtykkjast av verandi limakommununum. Sí skjal 5. *Uppskot til broytingar í viðtøkunum hjá IRF*.

**Burturkast frá fyritøkum og virkjum**

Víst verður til skjal 6. *Mannagongdir og prísir hjá KB og IRF* sum í høvuðsheitum lýsir hvussu KB og IRF gera í dag viðvíkjandi innsavning, fakturering v.m. og hvussu hetta kann skipast eftir eina samanlegging.

Í Tórshavnar kommunu eru tað í dag privatar flutningsfyritøkur, ið umsita at heinta burturkast frá fyritøkum og virkjum. KB hevur ein prís til vinnuna fyri burturbeining, og avroknar vinnan sjálv flutningskostnað við privatu flutningsfyritøkurnar. Hjá IRF er tað IRF, ið heintar burturkast frá fyritøkum og virkjum. Allir prísir hjá IRF eru íroknað flutning.

Prísirnir hjá KB vóru seinast dagførdir í 2012, meðan prísirnir hjá IRF verða leypandi dagførdir – seinast í 2019. Hjá KB so fíggjar vinnan ikki rakstur og/ella íløgur á økinum. T.v.s. at prísirnir eru settir út frá, hvat burturkastið kostar at brenna/viðgera/flyta av landinum. Hjá IRF eru prísirnir ásettir eftir, bæði hvat burturbeiningin kostar og eftir rakstrarútreiðslum og komandi íløgum.

Samanbera vit kostnaðin fyri vinnuna, at beina burtur burturkast hjá KB og IRF, so vísir tað seg, at munurin ikki er serliga stórur. Viðhvørt er leisturin hjá KB bíligari og viðhvørt leisturin hjá IRF – alt eftir strekki millum vinnu og brennistøð og burturkastmongd. Sí prísdømir í skjal 6. *Mannagongdir og prísir hjá KB og IRF*.

Eftir eina samanlegging fer IRF bæði at hava ein prís, har flutningur er íroknaður, og ein har flutningur ikki er íroknaður. Hetta merkir, at vinnan framhaldandi kann velja at nýta privatar flutningsfyritøkur til sítt burturkast ella at nýta IRF.

**Nýggj brennistøð**
Ein av høvuðsorsøkunum til eina samanlegging av KB og IRF er nýggj felags brennistøð. Í hesum liggur, at báðar brennistøðirnar hjá KB og IRF eru gamlar og ótíðarhóskandi. Tað ber ikki til at endurnýggja tær báðar gomlu brennistøðirnar meira, enn tær longu eru nú í dag. Avbjóðingin er - at vegna økt virksemi og fólkavøkstur í Føroyum - so gongur brenniorkan hjá KB møguliga undan í 2019 og brenniorkan hjá IRF í 2024.

Tískil skulu bæði KB og IRF sum skjótast hava nýggjar brennistøðir. Í hesum sambandi hava TK og IRF umrøtt at gera eina felags brennistøð fyri alt landið, og at henda verður staðsett á Hjalla. Hetta er skilagóð loysn, so munandi meiri orka kann veitast til Fjarhitafelagið samstundis sum stórar fíggjarligar sparingar kunnu gerast við at byggja eina brennistøð heldur enn tvær.

Tórshavnar kommuna og IRF hava í hesum sambandi ráðført seg við ráðgevarafyritøkuna Rambøll, sum hevur gjørt eitt fyribils uppskot og leist til nýggja felags nútímans brennistøð við tveimum ovnum. Sí skjal 7. *Projektforslag til nyt fælles forbrændingsanlæg*, sum lýsir viðurskiftini og eina kostnaðarmeting.

**Annað tilfar**
Ein yvirskipað lýsing av eini samanlegging av KB og IRF sæst í skjal 8. *Innliman av TK í IRF*, sum lýsir viðurskiftini og broytingar hjá IRF og TK í hesum sambandi.

Yvirskipað tøl hjá IRF, t.e. roknskapur, íløgur og lántøkur eru at síggja í skjali 10.

Lýsing Kommunalu brennistøðini er útgreinað í skjali 11, herundir bygnaður, virksemið, aktiv v.m.

Innleiðandi í samráðingunum heitti TK og IRF eisini á Rambøll um ráðgeving í sambandi við eina samanlegging av KB og IRF, og gjørdi IRF eitt notat um møguligar tilgongdir og lýsir notatið eisini fyrimunir við eini samanlegging. Sí skjal 12. *Rambøll-Sammenlægning af affaldsaktiviteter*.

**Skjøl:**
Skjøl, sum eru viðkomandi fyri málið:
1. Lýsing av samanleggingini
2. Avtala limaskapur TK
3. Avtala ognir TK
4. Partaeigarasáttmáli - Fjarhitafelagið 22-03-2019
5. Uppskot til broytingar í viðtøkum hjá IRF
6. Mannagongdir og prísir hjá KB og IRF
7. Projektforslag til nyt fælles forbrændingsanlæg
8. Innliman av TK í IRF
9. Tyrvingar- og rottangapláss í Kvívík
10. Roknskapur, íløgur og lántøkur hjá IRF
11. Lýsing av Kommunalu Brennistøðini
12. Rambøll-Sammenlægning af affaldsaktiviteter

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at Tórshavnar kommuna verður limur í IRF undir nevndu fortreytunum sambært:
1. avtalu um limaskap hjá Tórshavnar kommunu í IRF
2. avtalu um lendi og ognir hjá Tórshavnar kommunu
3. partaeigarasáttmála viðv. Fjarhitafelagnum

og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Seinastu mánaðirnar hava fleiri framløgur og samráðingar verið við politisku skipanina í Tórshavnar kommunu og við IRF um samanlegging av KB og IRF. Í hesum er avgjørt, at ognarskapur av Fjarhitafelagnum ikki er partur av samanleggingini av KB og IRF. Tískil er skjalið ″Partaeigarasáttmáli viðv. Fjarhitafelagnum″ tikið burtur og er ikki longur partur av málinum.

Umsitingin hevur gjørt eitt notat, sum tekur samanum fíggjarligu viðurskiftini hjá Tórshavnar kommunu við og uttan samanlegging. Talan er um skjal nr. 4 "Fíggjarlig viðurskifti hjá TK við og uttan samanlegging av KB og IRF".

Grundarlagið undir skjal 4 er skjal 13 "Rakstur og íløgur KB_master"

Eftir ynski frá politisku skipanini, hevur umsitingin heitt á Spekt um at kanna alt tilfarið, sum hevur við fíggjarligu viðurskiftini at gera. Spekt hevur fingið alt tilfarið í málinum, fleiri fundir hava verið millum Spekt og umsitingina og tillagingar eru gjørdar í tilfarinum. Eftir tær broytingar sum eru gjørdar síðan seinasta fund, eru viðkomandi skjøl fyri málið hesi:

**Skjøl:**
1. Lýsing av samanleggingini
2. Avtala limaskapur TK
3. Avtala ognir TK

4. Fíggjarlig viðurskifti hjá TK við og uttan samanlegging av KB og IRF
5. Uppskot til broytingar í viðtøkum hjá IRF
6. Mannagongdir og prísir hjá KB og IRF
7. Projektforslag til nyt fælles forbrændingsanlæg
8. Innliman av TK í IRF
9. Tyrvingar- og rottangapláss í Kvívík
10. Roknskapur, íløgur og lántøkur hjá IRF
11. Lýsing av Kommunalu Brennistøðini
12. Rambøll-Sammenlægning af affaldsaktiviteter
13. Rakstur og íløgur KB_master.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 25. november 2019:** Útsett.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. desember 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til nakrar broytingar í §1 í skjalinum j.nr. 18/01200-14, Avtala um limaskap, soleiðis at §1 nú verður soljóðandi:

*Tórshavnar kommuna gerst limur í IRF frá 1. mars 2020 at rokna.*

*Í hesum sambandi eru partarnir samdir um, at hesar broytingar í viðtøkum felagsins verða framdar innan 1. mars 2020:*

*at § 12 stk. 1 verður broytt til: "Á aðalfundium verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeirluta, og hava limirnir eins nógvar atkvøður sum íbúgvar vóru í kommununi 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at tað skulu í minsta lagi 3 limakommunur atkvøða fyri einum máli, fyri at fáa tað samtykt.*

*at § 14 stk. 1 verður broytt til "í nevndini verða valdir 7 limir".*

*at í § 14 stk. 2 kemur afturat, "Tórshavnar kommuna velur ein lim í nevndina".*

*at nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni. Tórshavnar kommunan fær formannin aðru hvørja setu og næstformannin aðru hvørja setu.*

*Somuleiðis eru partarnir samdir um, sum treyt fyri limaskapinum og hesum sáttmála, at allar ásetingar niðanfyri verða fylgdar.*

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. januar 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Turið Horn og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum til fundin 1. apríl 2019 við ískoytinum omanfyri og krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Allir flokkar í býráðnum seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

"At seta arbeiðsbólk at lýsa fíggjarligu fyrimunir og vansar fyri Tórshavnar kommunu at gera eina felags brennistøð ella framhaldandi skulu hava tvær brennistøðir. Kannast skal eisini hvørjir orku- og umhvørvisligir fyrimunir og vansar eru við einari ella tveimum brennistøðum.

Arbeiðsbólkurin skal vera mannaður av uttanhýsis serkønum innan fíggjarviðurskifti, verkfrøði og orku/umhvørvi.

Arbeiðsbólkurin skal gera eina búskaparliga frágreiðing og greining av, hvussu framtíðin sær út í Tórshavnar kommunu við atliti at brenning, burturbeining og framtíðar skiljing av ruski, tá vit skulu verða meira burðardygg á tí grønu leiðini. Somuleiðis verður at kanna hvat tað kostar at byggja nýggjan ovn afturat verandi ovni á Sandvíkarhjalla

Arbeiðsbólkurin skal gera eina tørvsmetning av, hvat ið krevst av plássi, stødd á brennistøð og hvørjir matr. á Hjalla eru tøkir til møguligt økt virksemi á økinum eitt nú høll til at skilja, brennistøð o.a.

Politiskur fylgibólkur umboðandi allar flokkar í Býráðnum verður settur til tess at fylgja arbeiðinum."

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá øllum flokkum í býráðnum, ið varð einmælt samtykt.

# 19/20 Uttanhýsis kanning av samanlegging av KB og IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 19/20 | 20/00345-1 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Kommuna hevur í longri tíð arbeitt við einari samanlegging ímillum IRF og KOB. Higartil hevur tað ikki verið politisk undirtøka fyri samanleggingini.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin í Tórshavnar Býráð taka ikki undir, at IRF og KOB verða løgd saman við núverandi grundarlagi. Málið er so stórt og so týðandi fyri framtíðina, at tað er alt avgerðandi at ein avgerð byggir á eina breiða semju í Tórshavnar Býráði.

Higartil hevur tað mest skynsama verið at Tórshavnar Kommuna sjálv hevur loyst málið um brenning og burturbeining av ruski. Um henda støða skal broytast, so skal tað byggja á neyvar kanningar, haldgóða framtíðarloysn og breiða semju.

Tórshavnar Kommuna er ein stór búskaparlig eind í mun til allar hinar kommunalu eindirnar í Føroyum, tí skulu neyvari kanningar gerast av uttanhýsis ráðgeva, sum fult út greinar, hvørjir fyrimunir og vansar eru við samanlegging. Loysnin sum verður funnin í málinum um burturbeining, brenning og skiljing av ruski skal vera ein partur av samlaða orku- og umhvørvispolitikkinum í Tórshavnar Kommunu.

Tí leggja Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin soljóðandi uppskot til samtyktar:

Vit skjóta upp, at Tórshavnar Býráð samtykkir at heita á ein føroyskan uttanhýsis ráðgeva, ið fær til uppgávu:

- at gera eina búskaparliga frágreiðing og greining av, hvussu framtíðin sær út í Tórshavnar Kommunu, við atliti til brenning, burturbeining og framtíðar skiljing av ruski, tá vit skulu verða meira burðardygg á tí grønu leiðini.
- at fáa eina tørvskanning av, hvat ið krevst av plássi, stødd á brennistøð, og hvørjir matr. á Hjalla eru tøkir til møguligt økt virksemi á økinum - eitt nú høll til at skilja, brennistøð o.a.
- at greina, hvat tað kostar at byggja nýggjan ovn afturat verandi ovni á Sandvíkahjalla
- í øðrum lagi at kanna kostnaðin at byggja nýggja brennistøð, sum loysir komandi tørvin hjá Tórshavnar kommunu

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Allir flokkar í býráðnum seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

"At seta arbeiðsbólk at lýsa fíggjarligu fyrimunir og vansar fyri Tórshavnar kommunu at gera eina felags brennistøð ella framhaldandi skulu hava tvær brennistøðir. Kannast skal eisini hvørjir orku- og umhvørvisligir fyrimunir og vansar eru við einari ella tveimum brennistøðum.

Arbeiðsbólkurin skal vera mannaður av uttanhýsis serkønum innan fíggjarviðurskifti, verkfrøði og orku/umhvørvi.

Arbeiðsbólkurin skal gera eina búskaparliga frágreiðing og greining av, hvussu framtíðin sær út í Tórshavnar kommunu við atliti at brenning, burturbeining og framtíðar skiljing av ruski, tá vit skulu verða meira burðardygg á tí grønu leiðini. Somuleiðis verður at kanna hvat tað kostar at byggja nýggjan ovn afturat verandi ovni á Sandvíkarhjalla

Arbeiðsbólkurin skal gera eina tørvsmetning av, hvat ið krevst av plássi, stødd á brennistøð og hvørjir matr. á Hjalla eru tøkir til møguligt økt virksemi á økinum eitt nú høll til at skilja, brennistøð o.a.

Politiskur fylgibólkur umboðandi allar flokkar í Býráðnum verður settur til tess at fylgja arbeiðinum."

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá øllum flokkum í býráðnum, ið varð einmælt samtykt.

# 20/20 Dagføring av burturkastgjøldum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.01.2020 | 2/20 | 19/04775-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 23/20 | 19/04775-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 20/20 | 19/04775-1 |

**Upprunin til málið:**
Tað hevur ikki verið nøkur dagføring av prísunum síðani 2012, tískil er neyðugt at dagføra prísirnar, fyri at fylgja kostnaðinum í samfelagnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Prísirnir eru ásettir í samsvari við samtykta gjaldspolitikkin, t.v.s. at prísirnir byggja í høvuðsheitum á útrokningar av viðgerðarkostnaðinum fyri ymsu burturkastsløgini, eins og gjørdar eru ávísar neyðugar tillagingar av prísunum í mun til viðgerðarkostnaðir, til tess at samlaða skipanin í mest møguligan mun skal ”hanga saman” samsvarandi gjaldspolitikkinum.
Prísirnir kunnu verða kr./kg, kr./$m^3$ ella pr. eind

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð 147 frá 18. okt. 1995 um burturkast, har tað sambært § 16 øll gjøld skulu góðkennast av Føroya Landsstýri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2012-0304 Reglugerð um skráseting og gjald fyri gjaldskyldugt burturkast
2012-0367 Ásetan av burturkastgjøldum

**Skjøl**
19/04775-2 Vinnuligt burturkast prísir og mongdir 2019

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | X |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | X |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Brennistøðini mæla til at taka undir við dagføringini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur ikki undir við dagføringini.

Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Náttúru- og umhvørvisnevnini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við dagføringini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Annfinni Brekkstein um at beina málið aftur í nevnd, ið varð einmælt samtykt.

Málið beint aftur í náttúru- og umhvørvisnevndina.

## 21/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 122/19 | 19/00096-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 100/19 | 19/00096-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 145/19 | 19/00096-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 129/19 | 19/00096-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 204/19 | 19/00096-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 167/19 | 19/00096-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 251/19 | 19/00096-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 229/19 | 19/00096-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 283/19 | 19/00096-1 |
| 14 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 258/19 | 19/00096-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 334/19 | 19/00096-1 |
| 16 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 288/19 | 19/00096-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 28/20 | 19/00096-1 |
| 18 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 21/20 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 20:45</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Annfinn Brekkstein | Jákup Dam |
| Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Heðin Mortensen |
| | Jan Kartin Christiansen | |